Løgmálaráðið

Dagfesting:	23.09.2025
Mál nr.:	24/26438-55
Málsviðgjørt:	EM
Ummælistíð:	01.07.2025 – 08.08.2025
Eftirkannað:	25.08.2025

Uppskot til

Løgtingslóg
um
sterilisatión og kastratión
(Sterilisatiónslógin)

Virkisøki

§ 1. Ásetingarnar í hesi løgtingslóg eru galdandi fyri kastration, tað vil siga inntriv, har kynskertlarnir verða burturbeindir, ella viðgerðir, har teir verða varandi óvirknir, og fyri sterilisatión, tað vil siga onnur inntriv, sum varandi avtaka nøringarførið.
Stk. 2. Inntriv og viðgerðir til at grøða likamliga sjúku eru ikki fevnd av løgtingslógini.

Sterilisatión, sum ikki krevur loyvi

§ 2. Øll yvir 25 ár, og sum búgva í Føroyum, kunnu steriliserast uttan loyvi. Sterilisering av persónum millum 25 og 30 ár kann ikki verða framd fyrr enn 6 mánaðir eftir, at viðkomandi hevur fingið ávísing frá kommunulækna, samanber tó § 3.

Stk. 2. Viðgerandi lækni kann taka avgerð um, at sterilisatión kann verða framd, áðrenn freistin sambært stk. 1 er úti, har serlig atlit tala fyri hesum. Hetta er tó ikki galdandi fyri persónar, sum eru fevndir av §§ 6 og 7.

§ 3. Kvinna kann verða steriliserað, tá ið viðurskifti bara ella einamest av læknaligum slag gera tað neyðugt at fyribyrgja, at kvinna gerst við barn, til tess at forða fyri vanda fyri lívi hennara ella vanda fyri, at heilsa hennara fer at versna álvarsliga og varandi.
Stk. 2. Um treytirnar í stk. 1 eru loknar, kann hjúnafelagin ella sambúgvin hjá viðkomandi í staðin fáa loyvi til sterilisatión, samanber tó § 4, stk. 3.

Sterilisatión, sum krevur loyvi

§ 4. Um treytirnar í §§ 2 ella 3 ikki eru loknar, kann loyvi til sterilisatión verða givið til fólk, búsitandi í Føroyum, um:

1) tað orsakað av ættarbregði hjá umsøkjaranum ella hjúnafelaganum ella sambúgvanum er slíkur vandi fyri, at møgulig børn fáa álvarsligar likamligar ella sálarligar sjúkur, at tað má metast at vera ynskiligt at fyribyrgja barnsburð,
2) umsøkjarin ella hjúnafelagin ella sambúgvin orsakað av sálarsjúku ella øðrum sálarligum órógvi, veikari gávuføri, grovum lyndisfrávikum ella álvarsligari likamligari sjúku, ikki megna at hava umsorgan fyri børnum á fullgóðan hátt,
3) tað av serligum orsøkum er týðandi vandi fyri, at umsøkjarin ella hjúnafelagin ella sambúgvin ikki megnar at fullføra viðgongutíðina, ella at barnið ikki verður lívført ella verður føtt við týðandi skaða, ella
4) umstøðurnar, sum umsøkjarin og familjan liva undir, gera tað neyðugt at sleppa undan barnsburði. Tá ið avgerð verður tikin, skal atlit takast at heilsuviðurskiftum, bústaðarviðurskiftum og fíggjarligum viðurskiftum hjá familjuni umframt tali av børnum heima, og um fleiri børn væntandi fara at elva til munandi tyngjandi umstøður við viknaðari heilsustøðu hjá umsøkjaranum, munandi størri arbeiðsbyrðu ella á annan hátt.

Stk. 2. Tá ið avgerð verður tikin um, hvørt sterilisatión kann verða loyvd, skal dentur leggjast á, hvørt umstøðurnar, ið tala fyri sterilisatión, kunnu roknast at vera av varandi slag. Eisini skal dentur leggjast á, um viðgongutíðin hóskandi kann fyribyrgjast á annan hátt.

Stk. 3. Sterilisatión av persónum undir 18 ár kann ikki verða loyvd, uttan so at heilt serligar umstøður tala fyri tí.

Umsókn um sterilisatión, ráðgeving o.a.

§ 5. Umsókn um sterilisatión verður undirskrivað og latin einum kommunulækna av tí, sum inntrivið skal fremjast á, samanber tó §§ 6 og 7.

Stk. 2. Er viðkomandi innlagdur á psykiatriska deplinum ella undir eftirliti hjá psykiatriska deplinum, kann umsóknin latast avvarðandi yvirlækna.

§ 6. Er tann, sum hevur søkt um sterilisatión sambært § 5 orsakað av sálarsjúku, viknaðum sinnisligum virksiføri ella álvarliga viknaðari heilsu ella líknandi ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið sambært § 11 eftir umsókn frá einum verja ella serligum verja geva loyvi til sterilisatión, um hetta verður mett neyðugt fyri at verja heilsuna ella lívsumstøðurnar hjá viðkomandi. Fyri tilnevnan av verja eru §§ 5 og 50 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven galdandi.

§ 7. Er tann, sum inntrivið skal fremjast á, ómyndugur ella undir verjumáli, hevur sálarsjúku, viknað sinnisligt virkisføri, ella tað av sálarligu støðuni hjá umsøkjaranum annars er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, kann samráðið loyva sterilisatión eftir umsókn frá viðkomandi og tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan ella einum verja ella serligum verja. Fyri tilnevnan av verja eru §§ 5 og 50 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven galdandi.

§ 8. Um treytirnar í § 2, stk. 1 ella § 3, stk. 1, eru loknar, uttan at umstøður, sum nevndar eru í §§ 6 ella 7 fyriliggja, skal læknin ávísa viðkomandi til sterilisatiónsviðgerð. Annars skal læknin leggja umsóknina fyri samráðið saman við sínum úttalilsi.

§ 9. Verður søkt um sterilisatión sambært §§ 6 ella 7, skal tann, sum inntrivið er ætlað á, hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu, áðrenn samráðið viðger umsóknina.

§ 10. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um umsókn um sterilisatión og um viðgerð av málum um sterilisatión.
Landsstýrisfólkið ásetir somuleiðis nærri reglur um ráðgeving og stuðulssamrøðu í sambandi við sterilisatión.

Vegleiðing og kunning frá lækna

§ 11. Læknin, sum fær umsóknina um sterilisatión, skal vegleiða og kunna tann, sum inntrivið skal fremjast á, um sjálvt inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið.
Tað sama er galdandi fyri tann, sum søkir sambært §§ 6 og 7.

Samráð

§ 12. Landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum skjótast gjørligt tekur avgerð í málum sambært § 3, stk. 2, og §§ 4, 6 og 7.
Stk. 2. Í samráðnum eru ein løgfrøðingur, ein serlækni í psykiatri og ein sosialráðgevi.
Stk. 3. Limirnir í samráðnum og teirra varalimir sita 4 ár í senn.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið.

§ 13. Avgerðir í samráðnum verða tiknar við vanligum meiriluta.

Kæra

§ 14. Avgerðir hjá samráðnum kunnu kærast til Føroya Kærustovn í seinasta lagi 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.
Stk. 2. Serkøn hjá Føroya Kærustovni í hesum málum eru ein serlækni í kvinnusjúkum og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin.
Stk. 3. Burtursæð frá stk. 1 og 2 er løgtingslóg um Føroya Kærustovn galdandi fyri málsgongdina í Føroya Kærustovni.

Kastratión

§ 15. Samráðið kann, eftir at hava fingið eina frágreiðing frá rættarlæknaráðnum, geva persóni, sum býr í Føroyum, loyvi til kastratión, um kynstráanin setur viðkomandi í vanda fyri at fremja brotsgerðir ella førir við sær álvarsligar sálarligar sjúkur ella sosiala skerjan.

§ 16. Loyvi kann ikki verða givið til kastratión av persóni undir 25 ár.

§ 17. §§ 6, 7 og 11 eru somuleiðis galdandi fyri umsóknir um kastratión.

§ 18. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um umsókn um kastratión og um viðgerð av málum um kastratión.

Felagsreglur

§ 19. Sterilisatión og kastratión kann bara verða framd av serlæknum í kvinnusjúkum, obstetrik og urologi.

Revsiásetingar

§ 20. Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini verður tann, sum fremur sterilisatión ella kastratión uttan, at treytirnar sambært hesi løgtingslóg eru loknar, revsaður við sekt.

Gildiskoma og úrgildisseting

§ 21. Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2026, og samstundis fer úr gildi lov nr. 234 af 3. juni 1967 om sterilisation og kastration.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur avgjørt at endurskoða sterilisatiónslógina.

Galdandi lóg um sterilisatión og kastratión er frá 1967 og er í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Landsstýrismaðurin avgjørdi í 2023 at endurskoða forsturtøkulógina, og í sambandi við fyrireikandi arbeiðið kom fram, at tørvur eisini var á at endurskoða sterilisatiónslógina.

1.2. Galdandi lóggáva
Reglur um sterilisatión og kastratión eru ásettar í lov nr. 234 af 3. juni 1967 om sterilisation og kastration, sum sett í gildi við kongelig anordning nr. 73 frá 14. marts 1968, og sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017.

Sterilisatión
Sambært lógini krevst loyvi til sterilisatión uttan so, at serlig læknalig atlit gera tað neyðugt at fremja inntrivið, t.d. um lív og heilsa er í vanda. Í slíkum føri kann inntrivið góðkennast av viðkomandi yvirlækna á Landssjúkrahúsinum uttan loyvi frá Sterilisatiónsnevndini. Somuleiðis kunnu persónar undir 18 ár ikki steriliserast, uttan so at heilt serligar orsakir tala fyri tí.

Loyvi til sterilisatión kann verða givið í fýra førum:

1. Um vandi er fyri álvarsligari sjúku hjá børnum orsakað av ættarbregði.
2. Um umsøkjarin orsakað av sálarsjúku, øðrum sálarligum trupulleikum ella álvarsligari likamligari sjúku ikki megnar at hava umsorgan fyri børnum á fullgóðan hátt.
3. Um umstøðurnar, sum umsøkjarin og familjan liva undir, gera tað neyðugt at forða fyri barnsburði. Atlit skal takast at heilsu-, bústaðar- og fíggjarviðurskiftum umframt tali av børnum, og um fleiri børn væntandi fara at elva til munandi tyngjandi umstøður orsakað av viknaðari heilsustøðu hjá umsøkjaranum, munandi størri arbeiðsbyrðu ella á annan hátt.
4. Um tað av serligum orsøkum er týðandi vandi fyri, at kvinnan ikki megnar viðgongutíðina, ella at barnið ikki verður lívført ella verður føtt við týðandi skaða.

Loyvi verður bara givið, um semja er um tað í Sterilisatiónsnevndini, um tey viðurskifti, sum grunda inntrivið, verða mett varandi, og um onnur fyribyrging ikki er nøktandi. Avgerðir hjá nevndini kunnu kærast til landsstýrisfólkið.

Loyvi verður vanliga ikki givið, um umsøkjarin er undir 25 ár.

Er umsøkjarin giftur og livir saman við hjúnafelaganum, skal ein váttan innheintast frá hjúnafelagnum uttan so, at serlig viðurskifti tala í móti hesum.

Um umsøkjarin ikki skilir týdningin av inntrivinum, kann ein verji ella serligur verji søkja um sterilisatión.

Kastratión
Persónar undir 21 ár kunnu sum meginregla ikki kastrerast, uttan so at serligar orsakir tala fyri tí.

Loyvi til kastratión kann verða givið, um kynstráanin hjá tí einstaka førir til álvarsligar sálarligar ella sosialar trupulleikar, ella vandi er fyri lógarbrotum. Avgerðir verða tiknar av landsstýrisfólkinum eftir váttan frá Rættarlæknaráðnum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við lógaruppskotinum er at dagføra og nútímansgera galdandi lóg um sterilisatión og kastratión. Samstundis verður lógin føroyskað.

Endamálið við uppskotinum er at tryggja fólki lættari atgongd til sterilisatión. Talan er um eitt tilboð, og eingin heimild er til at fremja inntriv, sum eru fevnd av lógini, við tvingsli.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

1.4.1. Atgongd til sterilisatión
Spurningurin um sterilisatión er fyrst og fremst ein spurningur av persónligum slagi heldur enn ein læknalig viðgerð fyri sjúku. Í flestu førum er tað helst eingin ivi um, at viðkomandi, sum umhugsar sterilisatión, sjálvur kennir sína støðu best og sostatt er tann, sum er best førur fyri at taka avgerð um, hvørt viðkomandi skal hava børn, ella um viðkomandi skal hava fleiri børn. Tí verður skotið upp, at fólk fáa lættari atgongd til sterilisatión.

Skotið verður upp, at persónar, sum hava fylt 25 ár, og sum eru førir fyri at skilja týdningin av inntrivinum, hava rætt til at verða steriliseraðir. Tað er tí ikki neyðugt við loyvi fyri at verða steriliseraður.

Skotið verður upp, at fyri persónar undir 25 ár krevst loyvi til sterilisering. Um viðkomandi ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisering, krevst loyvi til tess.

Í slíkum førum kann ein verji, ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, søkja um sterilisatión vegna viðkomandi. Hetta er eisini galdandi í dag.

Sambært § 26 í verjumálslógini hevur persónur, sum verjumál er sett í verk fyri, framhaldandi rætt til samávirkan, og verjin hevur skyldu til at taka viðkomand við í týðandi avgerðir. Uttan mun til, hvussu víttfevnandi eitt verjumál er, kann viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, virka frítt persónliga. Tað merkir, at ein verji aldrin kann noyða viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, at gera eitthvørt ella til at lata vera við at gera eitthvørt.

Sambært galdandi lóg skal ein váttan innheintast frá hjúnafelaganum, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd.

Tað kann vera við til at tryggja sjónarmiðini hjá hjúnafelaganum ella samlivanum, um viðkomandi hevur rætt til at vera hoyrdur ella til at úttala seg, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd. Tó er hetta í andsøgn við rættin hjá fólki til sjálvi at taka avgerðina. Tað er eisini

trupult at áseta møguligar avleiðingar av ikki at handhevja eitt slíkt krav, um hjúnafelagin ella samlivin ikki verða hoyrd.

Er talan um hjún ella eitt samlivandi par, er tað natúrligt at geva viðkomandi høvi til at úttala seg. Mett verður tó ikki, at tað skal vera eitt lógarfest krav fyri at verða steriliseraður, at hjúnafelagin ella samlivin skal hoyrast ella úttala seg, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd.

1.4.2. Aldursmarkið

Tað er trupult at áseta eitt aldursmark fyri, nær fólk kunnu verða steriliserað uttan loyvi.

Sambært galdandi lóg krevst loyvi frá sterilisatiónsnevndini til sterilisatión. Sambært galdandi siðvenju verður loyvi sum meginregla ikki givið til sterilisatión, um umsøkjarin er yngri enn 25 ár.

Lógarbundni myndugleikaaldurin er 18 ár og endurspeglar ein grundleggjandi rætt um, at 18 ára gomul eru vaksin fólk, sum kunna taka avgerðir um sítt egna lív, undir hesum sína egnu reproduktivu heilsu og framtíð, so leingi tey kunnu geva kunnað samtykki til tess.

Eisini er í sunnheitslógini ásett, at 15 til 17 ára gomul sum meginregla sjálvi kunnu geva samtykki til viðgerð, men at foreldramyndugleikin sum meginregla skal kunnast og inndragast í støðutakanina hjá tí unga.

Hinvegin er sterilisatión sum greið meginregla eitt varandi inntriv, har tað ikki vendist aftur. Hóast tað í summum førum er møguligt at endurskapa nøringarførið eftir eina sterilisatión, kann tað ofta vera trupult, og eingin trygd er fyri, at tað eydnast at endurskapa nøringarførið. Tað kann eisini hava við sær ávísar útreiðslur fyri heilsuverkið, um fólk, sum eru steriliserað, seinni skulu hava hjálpt til at fáa børn.

Ein ávísur vandi kann vera fyri, at fólk, sum velja at verða steriliserað sum heilt ung, fara at angra inntrivið seinni í lívinum. Tað kann t.d. vera tí, at lívsumstøðurnar, sambond og persónligu viðurskiftini og menningin broytast munandi.

Víst verður eisini á, at í dag eru góðir møguleikar fyri at nýta aðra fyribyrging.

Samanumtikið verður tí skotið upp, at aldursmarkið fyri, nær fólk kunnu verða steriliserað uttan loyvi, hóskandi kann verður sett til 25 ár.

Tað er eitt krav, at tann, sum inntrivið skal fremjast á, skilir týdningin av inntrivinum.

1.4.2.1. Krav umhugsanartíð

Av tí at sterilisatión sum greið meginregla er eitt varandi inntriv, har tað ikki er møguligt at endurskapa nøringarførið, verður skotið upp, at persónar millum 25 og 30 ár, sum skilja týdningin av inntrivinum, ikki kunnu verða steriliseraðir fyrr enn 6 mánaðir eftir, at viðgerðartilboð er givið.

Endamálið við at áseta eina kravda umhugsanartíð á 6 mánaðir fyri persónar millum 25 og 30 ár er at tryggja, at hesi fáa møguleika til gjølla at umhuga avleiðingarnar av sterilisatión, ella

um onnur fyribyrging hóskandi kundi verið nýtt, serliga tí at talan sum meginregla er um eitt varandi inntriv.

1.4.3. Mannagongd

Fyri at verða steriliseraður, skal viðkomandi, sum ynskir tað, sjálvur søkja um tað við at venda sær til sín kommunulækna. Kommunulæknin kann síðani ávísa viðkomandi til ein serlækna í sjúkrahúsverkinum.

Viðkomandi kann eisini venda sær til ein annan kommunulækna, um so er, at tað eru umstøður sum gera, at viðkomandi ikki vil venda sær til sín egna lækna.

Er tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er ómyndugur og tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, kann ein verji ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, søkja vegna viðkomandi.

Læknin hevur skyldu til at vegleiða umsøkjaran um inntrivið og um møguligar fylgjur og vandan, sum er sambundin við inntrivið. Vegleiðingarskyldan er somuleiðis galdandi, um tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, ella ein verji søkja um sterilisatión vegna viðkomandi.

1.4.3.1. Ráðgeving og stuðulssamrøða

Er tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er ómyndugur og tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, skal viðkomandi hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu frá viðkomandi fakfólki, t.d. seksualvegleiðara ella sosialráðgeva.

Endamálið við ráðgevingini og stuðulssamrøðuni er at tryggja, at viðkomandi fær møguleika at hugsa og hugleiða um tað, at verða steriliseraður, út frá egnu fortreytunum hjá viðkomandi og fyri at verja og virða sjálvsavgerðarrættin og persónliga integritetin hjá tí einstaka, og soleiðis stuðla viðkomandi í at taka eina avgerð á upplýstum grundarlagi.

Ætlanin er at leggja hesa uppgávuna til Almannaverkið at røkja.

Almannaverkið hevur ábyrgd av sosial- og vælferðarøkinum í Føroyum og hevur neyðugu fakligu førleikarnar og skipanina til at veita ráðgeving í truplum og persónliga viðbreknum málum. Almannaverkið er einasti stovnur, sum hevur seksualvegleiðarar í starvi, sum eru serkønir í at stuðla ungum og fólki við skerdum førleikum í viðkvæmum lívsstøðum í at taka eina avgerð á væl upplýstum grundarlagi. Almannaverkið hevur eisini sosialráðgevar í starvi, sum eru førir fyri at røkja uppgávuna.

1.4.4. Samráð

Er tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, um viðkomandi er ómyndugur ella undir verjumáli, ella tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, krevur hetta serstakt loyvi.

Loyvi kann tá verða givið, um serligar umstøður eru, sum gera tað ynskiligt at forða fyri barnsburði, eitt nú um týðandi vandi er fyri arvaligum sjúkum, um umsøkjarin og makin ikki eru før fyri at taka sær av einum barni, um týðandi vandi er fyri, at umsøkjarin ikki megnar at fullføra viðgongutíðina, ella at eitt barn ikki verður lívført. Somuleiðis verður mett, at tørvur

er á eini áseting, sum heimilar, at sterilisatión við loyvi kann verða framd osakað av sosialum umstøðum.

Skotið verður upp, at landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum tekur avgerð um, hvørt ein persónur, sum ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, sum er ómyndugur ella undir verjumáli, ella um tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, kann verða steriliseraður.

Heldur enn at leggja hesa uppgávu til ein fyrisitingarligan myndugleika, verður uppgávan løgd til eitt samráð, sum verður mannað við fakfólki við læknafakligari, løgfrøðiligari, sosialfakligari ella sálarfrøðiligari vitan á økinum, so tryggjað verður, at mett er um øll viðkomandi viðurskifti, áðrenn loyvi verður givið til sterilisatión.

Fyri at tryggja, at samráðið er politiskt óheft, verður samráðið sett eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum og fakfeløgum.

Við at seta eitt samráð verður tað eitt og sama ráð, sum fer at meta um, hvørt treytirnar fyri at verða steriliseraður eru loknar, og um loyvi kann verða givið til sterilisatión ella ikki. Harvið verður siðvenja á økinum eisini eins, og hetta er við til at tryggja, at øll eru eins fyri lógini. Eisini verða opinleiki og gjøgnumskygni tryggjað í mun til tær avgerðir, sum verða tiknar av samráðnum.

Avgerðir hjá samráðnum kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Serkøn hjá Føroya Kærustovni í hesum málum eru ein serlækni í kvinnusjúkum og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin.

1.4.5. Kastratión

Kastratión er eitt álvarsligt inntriv, sum bara eigur at verða framt undir serligum umstøðum.

Eitt slíkt inntriv eigur bara at verða framt í teimum førum, har tað verður mett neyðugt, og har aðrir møguleikar ikki eru nøktandi.

Tí verður skotið upp, at kastratión bara kann verða framd, um serstakt loyvi verður givið til tess frá samráðnum. Loyvi verður bara givið, um kynstráanin setir viðkomandi í vanda fyri at fremja brotsgerðir ella førir við sær álvarsligar sálarligar sjúkur ella sosiala skerjan.

Áðrenn loyvi verður givið, skal ein frágreiðing frá Rættarlæknaráðnum fyriliggja, soleiðis at tryggjað verður, at kastratión bara verður framd í væl grundaðum førum.

Samsvarandi ásetingunum um sterilisatión í hesum uppskotinum, verður skotið upp, at loyvi ikki kann verða givið til kastratión av persóni undir 25 ár.

Uppskotið broytir galdandi lóg soleiðis, at aldursmarkið verður broytt frá at vera 21 ár til at vera 25 ár.

Av tí at loyvi til kastratión ikki verður givið, fyrr enn ein frágreiðing frá Rættarlæknaráðnum fyriliggur, verður mett, at tað ikki er neyðugt at áseta eina kravda umhugsanartíð í sambandi við kastratión. Hetta tí at viðkomandi tá vanliga hevur verið ígjøgnum eina longri metingargongd.

Sambært galdandi lóg er heimild til at geva loyvi til kastratión av persónum undir 18 ár, um heilt serligar orsakir tala fyri tí.

Skotið verður upp, at heimildin til at veita undantak, um heilt serligar orsakir tala fyri tí, verður strikað. Hetta er við til at tryggja rættindi hjá børnum og ungum.

Talan er um eitt somikið inntrívandi inntriv, sum kann hava ógvusligar kropsligar og sálarligar fylgjur fyri tann unga. Talan er eisini um eitt varandi inntriv. Um mett verður, at veruligur tørvur er á kastratión, er alternativ medisinsk viðgerð tøk, eins og tann ungi møguliga kann hava gagn av eitt nú psykoterapi, at vera undir fakligum eftirlit o.a.

1.4.6. Revsing
Sambært galdandi sterilisatiónslóg kann tann, sum fremur sterilisatión ella kastratión uttan, at treytirnar sambært lógini eru loknar, verða revsaður við sekt.

Hildið verður fast um, at tann, sum fremur sterilisatión ella kastratión uttan, at lógarásettu treytirnar eru loknar, kann revsast við sekt, um ikki harðari revsing er ásett eftir revsilógini.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið er lagt á almenna hoyringarportalin til almenna hoyring.

Uppskotið er sent beinleiðis til ummælis hjá:

- Almannaverkinum
- Amnesty International Føroyar
- Etiska ráðnum
- Familjufyrisitingini
- Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar
- Fríðum Vali
- Fútanum
- Føroya Kærustovni
- Føroya Pro Vita
- Gigni
- Javnstøðunevndini
- Landslæknanum
- Ljósmøðrafelag Føroya
- Læknafelag Føroya
- Mammuhjálpini
- MEGD
- Stjórnarráðunum
- Sjúkrahúsverkinum
- Familjufyrisitingini

Ummælistíðin var frá 1. juli 2025 til 8. august 2025.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, Umhvørvismálaráðið, Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Almanna- og mentamálaráðið og Heilsustýrið hava boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Kommunulæknafelag Føroya vísir á, at tað ikki krevur læknafakligan førleika at vurdera aldur og bústað. Tí er vert at umhugsa, at borgarin sjálvur bað sær tíð á viðgerðarstaðnum.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at borgarar vanliga skulu venda sær til sín kommunulækna fyrst, fyri at fáa ávísing víðari til eitthvørt. Kommunulæknin kennir ofta sjúkrasøguna og heilsustøðuna hjá borgaranum, og kommunulæknin kann greiða frá, hvat eitt inntriv sambært lógini ber við sær, avleiðingarnar av inntrivinum, og hvørjir vandar eru sambundnir við inntrivið. Somuleiðis kann kommunulæknin vegleiða um møguliga aðra fyribyrging.

Kommunulæknin kann eisini meta um, hvørt viðkomandi, sum ynskir at verða steriliseraður, er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión.

Samanumtikið metir Løgmálaráðið tað tí vera skilagott, at borgarin skal venda sær til ein kommunulækna fyri at fáa ávísing til víðari viðgerð.

Kommunulæknafelagið vísir eisini á, at tá talan er um sterilisatión av borgarum, sum eru minni mentir, er neyðugt at leiðreglur um ráðgeving og stuðulssamrøðu í sambandi við sterilisatión eisini eru klárar, tá lógaruppskotið verður sett í verk. Tað er neyðugt, at kommunulæknin veit og kann vegleiða um, hvør veitir óhefta ráðgeving og stuðulssamrøður, og hvar umsóknin um sterilisatión skal sendast.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at í uppskotinum er ásett, at um tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er ómyndugur, og tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, skal viðkomandi hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu frá viðkomandi fakfólki, t.d. seksualvegleiðara ella sosialráðgeva.

Sambært uppskotinum verða tað seksualráðgevar ella sosialráðgevar hjá Almannaverkinum, sum fara at røkja hesa uppgávu. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.4.3.1. í almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið um ráðgeving og stuðulssamrøðu.

Sambært uppskotinum er gildiskoman sett til 1. januar 2026, soleiðis at Almannaverkið fær tíð til at fyrireika seg til nýggju uppgávuna at veita ráðgeving og stuðulssamrøðu, og fyri at tíð skal verða til at skipa innihaldið í tilboðnum. Almannaverkið hevur boðað frá, at tey í næstum fara at skipa innihaldið í ráðgevingini, soleiðis at stovnurin er klárur at røkja uppgávuna, tá lógin kemur í gildi.

Heilsumálaráðið vísir á, at sambært §§ 2 og 15 í uppskotinum er ásett eitt bústaðarkrav fyri persónar, sum ynskja at steriliserast ella kastrerast.

Í viðmerkingunum stendur, at hetta vil siga, at viðkomandi skal vera skrásettur í Landsfólkayvirlitinum sum búsitandi í Føroyum.

Í kunngerð nr. 41 frá 27. apríl 2009 um gjald fyri sjúkrahúsviðgerð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 15 frá 3. mars 2020 stendur millum annað:

"§ 6. Persónar, sum í útbúgvingarørindum ella í sambandi við almannagagnligt arbeiði eru búsitandi uttanfyri Føroyar, sum eru í Føroyum, og sum frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í minsta lagi 5 ár tilsamans hava, eftir ávísing frá lækna,

rætt til ókeypis veitingar og viðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum eftir somu treytum, sum eru galdandi fyri persónar, sum eru búsitandi í Føroyum. [...]”

Fyri at tað verður gjørt enn greiðari hjá teimum, sum skulu umsita reglurnar í uppskotinum, kann Løgmálaráðið umhugsa at nágreina í uppskotinum, at bústaðarkravið, sambært §§ 2 og 15 í uppskotinum, er galdandi uttan mun til ásetingar í sjúkrahúslógini, undir hesum í omanfyrinevndu kunngerð.

Løgmálaráðið tekur hetta til eftirtektar og nágreinar serligu viðmerkingarnar til §§ 2 og 15 samsvarandi.

Klaksvíkar sjúkrahús vísir á, at kastratión og sterilisatión eru tvey heilt ymisk ting, og at hesi tí ikki áttu at verið nevnd í sama lógaruppskoti. Skotið verður upp, at tað verða gjørd tvey lógaruppskot, eitt um sterilisatión og eitt um kastratión.

Løgmálaráðið er samt við Sjúkrahúsverkinum í, at talan er um tvey ymisk inntriv. Tó so eru mannagongdir, ávísar metingar og viðgerð av umsókn um sterilisatión og kastratión eins, og tað verður eitt og sama samráð, sum skal geva loyvi til bæði sterilisatión og kastratión.

Harafturat kemur, at sambært málsøkjabýtinum er tað Løgmálaráðið sum varðar av bæði sterilisatión og kastratión. Fyrisitingarliga og lógartøkniliga talar hetta fyri at áseta reglur um sterilisatión og kastratión í eina lóg.

Samanumtikið metir Løgmálaráðið tí, at sterilisatión og kastratión kann verða fevnt av somu lóg.

Viðvíkjandi umhugsanartíð í sambandi við sterilisatión vísir Sjúkrahúsverkið á, at í staðin fyri at áseta eina umhugsanartíð á 6 mánaðir fyri persónar millum 25 og 30 ár, kundi aldursmarkið verið broytt, soleiðis at sterilisatión uttan loyvi kann veitast øllum borgarum, sum eru omanfyri 30 ár, men at allir borgarar, sum eru undir hetta, skulu søkja um loyvi til hesa viðgerð.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at ein slík skipan helst hevði verið einfaldari at umsitið.
Sambært galdandi siðvenju verður loyvi sum meginregla ikki givið til sterilisatión, um umsøkjarin er yngri enn 25 ár. Endamálið við uppskotinum er m.a. at tryggja fólki lættari atgongd til sterilisatión, og tað verður mett at vera í andsøgn við endamálið at hækka aldurmarkið, sum nú verður nýtt sambært galdandi siðvenju.

Mett verður, at eitt aldursmark á 25 ár er hóskandi, og hildið verður fast um aldursmarkið og kravda umhugsanartíð fyri persónar millum 25 og 30 ár. Víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.4.2. um aldursmarkið og pkt. 1.4.2.1 um umhugsanartíð í almennu viðmerkingunum.

Klaksvíkar sjúkrahús og Jóhan Petur Davidsen, yvirlækni og serlækni í urologi og parenkymkirurgi á Suðuroyar sjúkrahúsi mæla til, at tað eisini skal vera møguligt at fremja inntrivini í privatari praksis. Víst verður í hesum sambandi á, at sterilisatión í flestu av okkara grannalondum er eitt inntriv, ið ikki fer fram í almennum sjúkrahúsverki. Sterilisatión krevur operatiónskapacitet. Um hetta verður gjørt á almennum sjúkrahúsum, fer hetta at taka pláss hjá øðrum álvarsomum somatiskum sjúkum. Um inntrivið eisini kann fremjast í privatari praksis, fer hetta at lætta um fíggjarliga hjá almennu sjúkrahúsunum og at spara teimum operatiónskapasitet.

Alt eftir hvat inntriv talan er um, skal hetta fremjast av serlækna í kvinnusjúkum ella obstetrik ella serlækna í urologi.

Løgmálaráðið tekur undir við, at inntrivini eisini kunnu fremjast í privat praksis, tó so at tað beinleiðis í lógartekstinum verður sett krav um, at inntrivið verður framt av viðkomandi serlækna. Soleiðis verður tryggjað, at viðkomandi hevur autorisatión og er undir eftirliti. Løgmálaráðið skal viðmerkja, at um inntrivið verður framt í privat praksis, rindar borgarin sjálvur fyri inntrivið.

Samstundis sum tryggjað verður, at øll hava rætt til og atgongd til sterilisatión, um lógarásettu treytirnar annars eru loknar, fær borgarin harvið møguleikan at velja millum alment og privat tilboð. Tað almenna skal tó ikki bera eyka útreiðslur av tí, at einstaklingar velja eitt privat tilboð fram um ta almennu skipanina.

Klaksvíkar sjúkrahús og Jóhan Petur Davidsen, yvirlækni og serlækni í urologi og parenkymkirurgi á Suðuroyar sjúkrahúsi vísa eisini á, at kastratión ikki bara kann fremjast sum skurðviðgerð, men eisini sum medisinsk viðgerð, sum er líka effektiv, hvat viðvíkur ynskta virknað, men sum ikki er so inntrívandi. Haraftrat kemur effektivari heilivágur og viðgerð innan psykiatriina. Hetta hevur haft við sær, at kirurgisk kastratión fyri ikki likamliga sjúku í vesturheiminum stórt sæð ikki kemur fyri uttan í samband við kynsskiftisviðgerð.

Víst verður á dømi um, at kirurgisk kastratión kundi verið bjóðað monnum við dómi fyri kynsbrotsverk, har mett verður, at hetta kann verða avgerandi fyri at verða slúsaður út í samfelagið aftur, uttan vanda fyri endurtøku av brotsgerð. Sjálvt í slíkum føri vildi medisinsk og/ella psykiatrisk viðgerð í dag verið tøk og nøktandi til endamálið.

Víst verður á, at bæði skurðviðgerð og medisinsk viðgerð ofta verður nýtt sum liður í viðgerð av sjúkum, so sum prostatakrabba, endometriosu og ávísum hormontrupulleikum. Víst verður í hesum sambandi til ummælisskrivið, sum er lagt við sum fylgiskjal 3.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at sambært § 1, stk. 1 í uppskotinum eru inntriv og viðgerðir til at grøða likamliga sjúku ikki fevnd av lógini. Hesir viðgerðarhættir verða framvegis reguleraðir sambært vanligu reglunum í heilsulóggávuni, og eins og onnur medisinsk inntriv krevja tey kunnað samtykki og læknaliga indikatión.

Medisinsk kastratión hoyrir í verki til tað revsirættarliga økið. Viðgerð av hesum slagi verður í dag nýtt sum ein partur av revsi- og viðgerðarætlanum fyri ávísar brotsmenn, serliga teir, ið eru dømdir fyri kynsligar brotsgerðir. Tí er medisinsk kastratión ikki fevnd av hesum lógaruppskotinum.

Kastratión sum liður í kynsskiftisviðgerð er heldur ikki fevnt av hesum lógaruppskotinum.

Klaksvíkar sjúkrahús mælir til, at ein serlækni í psykiatri, endokrinologi, gynækologi/obstetrik og urologi átti at lisið og reviderað uppskotið, soleiðis at hetta passar til nútíðar medisinskan kunnleika.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at uppskotið er sent til ummælis hjá viðkomandi pørtum, og at øll hava havt høvi til at koma við viðmerkingum til uppskotið.

Landssjúkrahúsið tekur undir við viðmerkingunum frá Klaksvíkar Sjúkrahúsi.

Umframt hetta heldur Landssjúkrahúsið, at eitt argument fyri, hví umhugsanartíð er sett til fólk júst millum 25 og 30 ár er ófullfiggjað í uppskotinum. Snýr tað seg um burðarførið hjá fólki, so kundi hetta verið eitt argument, men tá skuldi aldursmarkið heldur samsvarað við nær flest byrja og steðga við at fáa børn. Snýr tað seg hinvegin um, at ung fólk ikki skilja, hvussu umfatandi og endaligt eitt inntriv sum sterilisatión og kastratión er, so eigur tað at vera aldursmark, at øll undir 30 ár skulu hava eina umhugsanartíð uppá 6 mánaðir, umframt innihaldsríka kunning um inntrivið.

Løgmálaráðð skal viðmerkja, at sambært galdandi siðvenju verður loyvi sum meginregla ikki givið til sterilisatión, um umsøkjarin er yngri enn 25 ár. Ætlanin er ikki at broyta hetta.

Uppskotið um umhugsanartíð fyri fólk millum 25 og 30 ár er serliga grundað á, at talan er um eitt varandi inntriv, har tað sum greið meginregla ikki vendist aftur. Endamálið við umshugunartíðini er tí at tryggja, at fólk gjølla umhuga avleiðingarnar av sterilisatión, ella um onnur fyribyrging hóskandi kundi verið nýtt,

MEGD mælir samanumtikið frá at samtykkja lógaruppskotið um sterilisering í verandi líki, tí tað kann loyva tvingsils- og brekgrundaðari sterilisatión, serliga av kvinnum við breki. Felagið heldur, at hetta er í beinleiðis ósamsvari við altjóða skyldur Føroya sambært brekrættindasáttmálanum, evropeiska mannarættindasáttmálanum og øðrum mannarættindasáttmálum. Uppskotið tryggjar ikki, at sjúk fólk og fólk við breki sjálvi, við hóskandi stuðli, kunnu taka avgerðir um egna sterilisering, og tað er ógreitt, hvussu kunnað samtykki verður tryggjað í praksis. Hetta kann føra til tvingsil, sum í summum førum kann metast sum píning, og sum kann hava álvarsligar og varandi avleiðingar. Víst verður í hesum sambandi til altjóða sáttmálar og úrskurð hjá Evropeiska mannarættindadómstólinum.

MEGD ávarar eisini móti, at lógaruppskotið leggur upp til ættarrøkt, tí tað kann forða fyri, at børn við ávísum brekum ella sjúkum verða fødd. Orðingar og hugtøk í uppskotinum byggja á ótíðarhóskandi og mismunarskapandi sjónarmið um brek, og lógin nýtir onga greiða allýsing av hugtakinum "brek" ella "sjúka". Tað merkir, at lógin kann verða nýtt ójavnt og skapa óvissu í rættarviðgerð. Eisini mangla greiðar ásetingar um rættarførið hjá fólki við breki og um teirra rætt til munagóða atgongd, tillagað samskifti og stuðul í avgerðartilgongdini.

MEGD vísir á, at sambært uppskotinum fáa fólk í boði ráðgeving og vegleiðing, men innihaldið er ikki nærri lýst. Nøkur týðandi ivamál standa tí ósvarað um, júst hvussu og í hvønn mun fólk, ið bera brek, sjálvi, m.a. við hóskandi stuðulstænastum, og rímiliga tillagaðum kørmum og umstøðum, kunnu taka hesa avgerð um sterilisatión. MEGD vísir í hesum sambandi á tilmæli til føroyskar myndugleikar í nýggjastu frágreiðingini hjá altjóða brekrættindanevndini frá september 2024 um m.a. at tillaga verjumálslógina.

Lógin byggja á galdandi donsku lóg. Uppskotið eigur í størri mun at verða gjørt við samfelagsligum og løgfrøðiligum fyrivarnum í huga og í størri mun at verða grundað á føroysk viðurskifti. Hetta eigur at verða gjørt m.a. við at lýsa evnið alment bæði fakliga og við kjaki. Eisini eigur nýggja lógin beinleiðis at forða fyri tvingsilssterilisatión og tryggja rættindi hjá børnum við breki, samstundis sum hugtøk frá gamlari heilivágs- og olmussuhugsan, so sum sálarlig sjúka, verða strikað, og altjóða brekrættindasáttmálin og tilmælini frá ST verða løgd til grundar.

Víst verður til ummælisskrivið í fullum líki, sum er lagt við sum skjal 6.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at sambært uppskotinum kann sterilisatión av persónum undir 25 ár og av persónum við skerdum førleikum verða framd, um nærri ásettar treytir eru loknar, eitt nú um týðandi vandi er fyri arvaligum sjúkum, um umsøkjarin og makin ikki eru før fyri at taka sær av einum barni, um týðandi vandi er fyri, at umsøkjarin ikki megnar at fullføra viðgongutíðina, ella at eitt barn ikki verður lívført. Somuleiðis kann loyvi verða givið osakað av sosialum umstøðum.

Ætlanin við uppskotinum er ikki at loyva ættarrøkt ella at gera mismun vegna brek, og Løgmálaráðið metir heldur ikki, at uppskotið leggur upp til hetta.

Uppskotið er mett í mun til altjóða sáttmálar, og víst verður í hesum sambandi til pkt. 2.7. í almennu viðmerkingunum um millumtjóðasáttmálar á økinum.

Ásetingarnar í § 4 eru undantaksreglur, og sterilisatión sambært hesum ásetingum krevur serstakt loyvi. Avgerandi fyri, um loyvi kann verða givið til sterilisatión er m.a., um ítøkiligur og læknaligur grundaður vandi er fyri, at eitt barn fer at fáa álvarsliga sjúku og um umsøkjarin megnar at hava umsorgan fyri einum barni ella ikki. Loyvi kann sostatt ikki verða givið til sterilisatión einans við tí grundgeving, at umsøkjarin t.d. ber brek ella hevur eina ávísa sjúku ella um eitt møgulig barn fær eina ávísa arvaliga sjúku. Hugtøk, sum verða brúkt í uppskotinum, so sum sálarlig sjúka, er læknafakliga væl lýst. Tí metir Løgmálaráðið ikki, at hetta eigur at verða strikað.

Tað er samráðið, sum er mannað við viðkomandi fakbólkum, sum tekur avgerðina. Tað er eisini beinleiðis ásett í lógartekstinum, at tá ið avgerð verður tikin um, hvørt sterilisatión kann verða loyvd, skal dentur leggjast á, hvørt umstøðurnar, ið tala fyri sterilisatión, kunnu roknast at vera av varandi slag. Eisini skal dentur leggjast á, um viðgongutíðin hóskandi kann fyribyrgjast á annan hátt. Somuleiðis er dentur lagdur á at veita ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki, soleiðis at tann, sum inntrivið er ætlað á, gerst førur fyri at taka eina stuðlaða avgerð um sterilisatión.

Tað er tó rætt, sum MEGD vísir á, at orðingin í § 6 um, at sterilisatión kann verða loyvd, "tá ið umstøðurnar tala fyri tí", og viðmerkingarnar til § 9 eru ógreiðar í mun til greiðu meginregluna um, at sterilisatión ikki kann verða framd við tvingsli. Viðmerkingarnar eru orðaðar soleiðis, at um viðkomandi, sum inntrivið er ætlað á, gevur til kennar ivasemi, ella at viðkomandi ikki vil steriliserast, viga hesar upplýsingar tungt í metingini hjá samráðnum, tá ið avgerð skal takast.

Tað er greitt, at sterilisatión ikki kann fremjast við tvingsli. Tí verður umrødda orðingin í § 6 strikað, og í staðin verður ásett, at sterilisatión kann verða loyvd, um tað verður mett neyðugt fyri at verja heilsuna og lívsumstøðurnar hjá viðkomandi.. Viðmerkingarnar til § 9 verða tillagaðar soleiðis, at um tað undir samrøðuni við seksualráðgevan greitt kemur fram, at viðkomandi ikki ynskir at verða steriliseraður, skal samráðið í síni viðgerð av málinum leggja hetta til grund og kann tá ikki geva loyvi til sterilisatión. Hetta verður eisini stuðlað av, at barnsburður ofta nøktandi kann fyribyrgjast á annan hátt enn við sterilisatión.

Sambært uppskotinum er gildiskoman sett til 1. januar 2026. Hetta m.a. fyri at Almannaverkið fær tíð til at fyrireika seg til nýggju uppgávuna at veita ráðgeving og stuðulssamrøðu, og fyri at tíð skal verða til at skipa innihaldið í tilboðnum. Almannaverkið hevur boðað frá, at tey í næstum fara at skipa innihaldið í ráðgevingini, soleiðis at stovnurin er klárur at røkja uppgávuna, tá lógin kemur í gildi.

Javnstøðunevndin
Javnstøðunevndin tekur yvirskipað undir við uppskotinum og vísir á, at við tað at tað einamest er viðkomandi sjálv ella sjálvur, sum ynskir at steriliserast, ið best kennir til sína egnu støðu, er tað sami ella sama viðkomandi, ið tískil hevur bestan førleika til at taka avgerð um sterilisatión.

Javnstøðunevndin tekur undir við, at hendan meginreglan – uttan at gera mun á kyni - verður sett í verk sambært uppskotinum.

Javnstøðunevndin metir lógaruppskotið vera eitt stig á røttu leiðini, serliga tá tað ræður um áseting um, at øll yvir 25 ár uttan mun til kyn fáa ræðisrætt til at velja sterilisatión.

Løgmálaráðið hevur ikki viðmerkingar til ummælisskrivið.

Etiska ráðið vísir á, at sambært viðmerkingunum til § 3, eigur ein kvinna "ikki at verða noydd at fullføra viðgongutíðina um vanligi vandin í viðgongutíðini og føðingini er øktur".

Skotið verður upp, at hetta verður umorðað, soleiðis at brotið ístaðin vísir til, at kvinnan eigur at kunnu fyribyrgja viðgongutíð við sterilisatión. Núverandi orðing kann nevniliga leggja upp til at steðga viðgongutíðini, tá hon longu er byrjað, ístaðin fyri at fyribyrgja henni, áðrenn hon byrjar, sum endamálið við sterilisatión er. Orðavalið kann sostatt elva til óhóskandi bland millum sterilisatión og fosturtøku.

Víst verður eisini á, at sambært viðmerkingunum til § 3 fevnir ásetingin um kvinnur eldri enn 25 ár. Men sambært § 2 hava allar kvinnur yvir 25 ár longu rætt til sterilisatión uttan loyvi.

Spurt verður, um § 3 tí ikki í staðin eigur at fevna um kvinnur undir 25 ár, ella um kvinnur undir 30 ár, um umhugsanartíðin skal kunna strikast.

Løgmálaráðið tekur hetta til eftirtektar og rættar viðmerkingarnar til § 3 samsvarandi.

Almannaverkið boðar frá, at tey í næstum fara at skipa innihaldið í ráðgevingini, soleiðis at stovnurin er klárur at røkja uppgávuna, tá lógin kemur í gildi.

Sambært uppskotinum verður talið av umsøkjarum, ið hava tørv á ráðgeving og stuðulssamrøðum frá Almannaverkinum, væntandi sera lágt, og Almannaverkið metir sostatt, at metta upphæddin á kr. 50.000 er nøktandi.

Løgmálaráðið hevur ikki viðmerkingar til ummælisskrivið.

Familjufyrisitingin setir spurnatekin við, um tað bara skal vera ein serligur verji, sum kann søkja um sterilisatión sambært §§ 6 og 7 í uppskotinum, ella um hetta eisini kann vera ein fastur verji sambært § 5 í verjumálslógini.

Til § 6 í uppskotinum vísir Familjufyrisitingin á, at um viðkomandi longu hevur ein verja, kann § 50 í verjumálslógini brúkast til at seta ein serligan verja, um áhugamálini hjá tí sum er undir verjumáli og áhugamálini hjá fasta verjanum eru í andsøgn. Tað vil siga, at tilnevna ein serligan verja sbrt. § 50 er treytað av, at verjumál er sett í verk sambært § 5 í verjumálslógini.
Tað ber eisini til at taka avgerð sambært §§ 5 og 50 undir somu viðgerð.

Familjufyrisitingin vísir á, at ómyndug eru nevnd í §§ 6 og 7 og fleiri staðni í almennu viðmerkingunum, men ikki fólk undir verjumáli. Víst verður á, at fólk undir verjumáli kundu verið nevnd, og at tað í hesum sambandi kundi verið víst til § 24 í verjumálslógini, har tað er ásett, at verjin skal røkja áhugamálini hjá tí, sum er undir verjumáli.

Víst verður á, at persónur, sum verjumál er sett í verk fyri, framhaldandi hevur rætt til samávirkan, og at verjin tískil hevur skyldu til at taka viðkomandi við í týðandi avgerðir sambært § 26 í verjumálslógini. Víðari verður víst á, at uttan mun til, hvussu víttfevnandi eitt verjumál er, kann viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, virka frítt persónliga. Tað merkir, at ein verji aldrin kann noyða viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, at gera eitthvørt ella til at lata vera við at gera eitthvørt.

Løgmálaráðið tekur viðmerkingarnar frá Familjufyrisitingini til eftirtektar. Bæði lógartekstur og viðmerkingar verða rættað samsvarandi.

Løgmálaráðið skal viðmerkja, at Familjufyrisitingin hevur skrivað viðmerkingar beinleiðis inn í lógaruppskotið. Tí eru viðmerkingarnar skrivaðar í ein samandrátt, sum verður lagdur við sum fylgiskjal 10.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært uppskotinum kunnu fólk, sum eru 25 ár og eldri, verða steriliserað uttan loyvi. Somuleiðis kunnu fólk, sum ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, og fólk, sum eru ómyndug, og har tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir, verða steriliserað undir nærri ásettum treytum og við loyvi frá samráðnum.

Sambært uppskotinum setir landsstýrisfólkið eitt samráð at taka avgerðir um, hvørt loyvi kann verða givið til sterilisatión, um umsøkjarin ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er undir 25 ár, og tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión.

Limirnir í samráðnum fáa samsýning sambært umfarsskrivi um nevndarsamsýningar hjá Fíggjarmálaráðnum, umframt koyripengar, alt eftir hvar limirnir búgva.

Sambært hagtølum hjá Landslæknanum vóru 102 umsóknir um sterilisatión í fjør, og í 2023 var talið 112. Annars hevur talið seinastu 10 árini ligið millum góðar 60 og 80 umsóknir árliga.

Av tí at fólk, sum eru 25 ár og eldri, sambært uppskotinum kunnu verða steriliserað uttan loyvi, verður talið á umsóknum til samráðið væntandi munandi lægri enn seinastu árini.

Avgerðirnar hjá samráðnum kunnu leggjast fyri Føroya Kærustovn. Serkøn hjá Føroya Kærustovni fáa sambært § 9, stk. 4 í løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn løn ella samsýning, sum landsstýrisfólkið ásetir.

Av tí at væntað verður, at talið á umsóknum minkar munandi, verður somuleiðis væntað, at talið á kærum verður lágt. Tí verður mett, at hetta kann verða loyst við verandi játtan.

Um søkt verður um sterilisatión sambært §§ 6 og 7 í uppskotinum, t.e. um viðkomandi, sum inntrivið er ætlað á, ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, og fólk, sum eru ómyndug, og har tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir, skal umsøkjarin hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøðu frá viðkomandi fakfólki, t.d. seksualvegleiðara, sosialráðgeva ella líknandi.

Ætlanin er, at hendan uppgávan verður løgd til Almannaverkið at umsita.

Talið á umsøkjarum, sum skulu hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøðu verður væntandi sera lágt.

Mett verður, at neyðugt er at seta 50.000 kr. av árliga til omanfyri nevndu endamál.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis umsitingarligar avleiðingar við sær.

Verandi sterilisatiónsnevnd viðgerð umsóknir um sterilisatión sambært galdandi lóg, har tað er ásett, at loyvi krevst til sterilisatión, uttan so at serlig læknalig atlit gera tað neyðugt at fremja inntrivið.

Sambært hagtølum hjá Landslæknanum vóru 102 umsóknir um sterilisatión í fjør, og í 2023 var talið 112. Annars hevur talið seinastu 10 árini ligið millum góðar 60 og 80 umsóknir árliga.

Sambært uppskotinum verður lættari atgongd til sterilisatión, soleiðis at fólk, eldri enn 25 ár, og sum eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ikki longur skulu søkja Sterilisatiónsnevndina um loyvi til at verða steriliserað.

Hetta fer tí at lætta munandi um umsitingina av økinum, og av tí sama verður mett, at tað frameftir árliga bara vera heilt fáar umsóknir um loyvi til sterilisatión.

Eitt samráð skal meta um, hvørt treytirnar fyri at verða steriliseraður eru loknar ella ikki.

Uppskotið hevur eisini nakað av umsitingarligum avleiðingum fyri Føroya Kærustovn, sum verður kærumyndugleiki. Av tí at væntað verður, at talið á umsóknum minkar munandi, verður somuleiðis væntað, at talið á kærum verður lágt.

Uppskotið hevur harafturat umsitingarligar avleiðingar fyri Almannaverkið, sum eftir ætlan skal umsita ráðgevingina og stuðulssamrøðuna, sum fólk, sum ikki eru før fyri at skilja týdningin av inntrivinum o.o., sum sambært §§ 6 og 7 skulu hava hetta í boði.

Hóast talið á teimum, sum skulu hava ráðgeving og stuðulssamrøðu í boði, væntandi verður lágt, fer hetta at hava nakað av umsitingarligum avleiðing við sær fyri Almannaverkið, av tí at talan er um eitt nýtt tilboð, og innihaldið skal skipast frá grundini.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur við sær eina upprøðfesting av sjálvsavgerðarrættinum hjá fólki.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá kvinnum (kvinnurættindasáttmálanum) er staðfest, at kvinnur sjálvar hava rætt til at gera av, um tær vilja hava børn, hvussu nógv børn tær vilja hava, nær tær vilja hava børn og við hvørjum. Í 1987 samtykti Løgtingið at seta sáttmálan í gildi fyri Føroyar, og sáttmálin er sostatt fólkarættarliga bindandi fyri Føroyar.

Sambært uppskotinum kunnu fólk sum meginregla sjálvi gera av, um tey vilja steriliserast. Er viðkomandi ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er ómyndugur, og tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, kann inntrivið verða framt undir nærri ásettum treytum.

Talan er tá altíð um eina ítøkiliga meting.

Í mai 2009 tóku Føroyar undir við sáttmála Sameindu tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek. Í sáttmálanum eru sjálvsavgerðarrættur og persónligur integritetur grundleggjandi atlit.

Í sáttmálanum er m.a. staðfest, at fólk, ið bera brek, hava rætt til at fáa sítt rættarføri viðurkent og eiga rættarføri á jøvnum føti við onnur í øllum lívsins viðurskiftum (grein 12). Fólk, ið bera brek, hava rætt til heilsutænastur grundað á samtykki á jøvnum føti við onnur (grein 25). Harafturat er staðfest, at ein og hvør, ið ber brek, hevur rætt til virðing fyri sínum likamliga og sálarliga sjálvræðisrætti (integritet) á jøvnum føti við onnur (grein 17), og at fólk, ið bera brek, hava rætt til at varðveita sítt frugtbari á jøvnum føti við onnur (grein 23).

Evropeiski mannarættindasáttmálin er settur í gildi í Føroyum við lóg hin 1. mai 2000.

Í sáttmálanum er staðfest, at ein og hvør hevur rætt til privatlív og familjulív (grein 8), og at kvinnur og menn hava rætt til at giftast og at stovna familju (grein 12).

Sambært uppskotinum skal tann, sum inntrivið skal fremjast á, sjálvur søkja um sterilisatión, tó so at eitt samráð eftir umbøn frá einum verja ella tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan kann loyva sterilisation, tá ið tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, um tað verður mett neyðugt fyri at verja heilsuna ella lívsumstøðurnar hjá viðkomandi.

Sambært uppskotinum skulu hesi hava í boði stuðulssamrøðu og ráðgeving frá viðkomandi fakfólki, áðrenn samráðið viðger umsóknina.

Endamálið við samrøðunum er at tryggja, at viðkomandi sjálvur fær møguleika at hugsa og hugleiða um tað at verða steriliseraður út frá egnu fortreytunum hjá viðkomandi. Endamálið er sostatt at verja og virða sjálvsavgerðarrættin og persónliga integritetin hjá tí einstaka, og soleiðis stuðla viðkomandi í at taka eina avgerð á upplýstum grundarlagi.

Sostatt er eingin heimild til at fremja inntrivið við tvingsli.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í andsøgn við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) ella Sáttmála Sameindu Tjóða hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki nýggjar markaforðingar við sær.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Sambært § 21 kann tann, sum fremur sterilisatión ella kastratión uttan, at treytirnar sambært hesi lóg eru loknar, verða revsaður sekt.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Verður søkt um sterilisatión sambært § 6 ella § 7, tað vil siga um tann, sum inntrivið skal fremjast á ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella viðkomandi er undir 18 ár, og tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir, skal læknin kunna um, at viðkomandi hevur rætt til óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu.

Læknin skal somuleiðis vegleiða og kunna um inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið. Vegleiðingarskyldan er galdandi mótvegis tí, sum inntrivið skal fremjast á, og verjanum ella tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan og søkja fyri viðkomandi.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Í § 10 verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um umsókn um sterilisatión og um viðgerð av málum um sterilisatión. Landsstýrisfólkinum verður somuleiðis heimilað at áseta nærri reglur um ráðgeving og stuðulssamrøðu í sambandi við sterilisatión.

Í § 12 verður heimilað landsstýrisfólkinum at seta samráðið, sum tekur avgerð um, hvørt loyvi kann verða givið til sterilisatión, og at áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið.

Í § 18 verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um umsókn um kastratión og um viðgerð av málum um kastratión.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið hevur ongar slíkar ásetingar.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Spurningurin um sterilisatión er fyrst og fremst ein spurningur av persónligum slagi.

Tað kann vera við til at tryggja rættindini hjá einum møguligum hjúnafelaga ella samliva, um viðkomandi hevur rætt til at verða hoyrdur ella til at úttala seg, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd. Tó er hetta í andsøgn við og ein avmarking av sjálvsavgerðarrættinum hjá fólki.

Ein avgerð um sterilisatión skal altíð byggja á kunnað samtykki, og hetta samtykki eigur ikki at verða treytað av samtykki frá øðrum, ella at onnur verða kunnaði um tað, uttan so, at viðkomandi, sum inntrivið skal fremjast á, ikki sjálvur er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum. Tað er eisini trupult at áseta møguligar avleiðingar av ikki at handhevja eitt slíkt krav, um hjúnafelagin ella samlivin ikki verður hoyrdur.

Er talan um hjún ella samlivandi par, er tað natúrligt at geva makanum høvi til at úttala seg. Mett verður tó ikki, at tað skal vera eitt lógarfest krav fyri at verða steriliseraður, at viðkomandi skal hoyrast ella úttala seg, áðrenn ein møgulig sterilisatión verður framd.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Í § 1, stk. 1 og 2, verður virkisøkið nágreinað. Hugtøkini sterilisatión og kastratión verða allýst, sum ávikavist eru skurðviðgerðir, har kynskertlarnir verða burturbeind ella viðgerðir, har tey verða varandi óvirkin (kastratión), og skurðviðgerðir, sum varandi avtaka nøringarførið (sterilisatión).

Lógin fevnir um viðgerð, har talan er um ein varandi virknað. Nøringarførið kann verða ávirkað av hormonviðgerð o.ø, men so leingi viðgerðin ikki ger kynsgøgnini varandi óvirkin ella varandi avtekur nøringarførið, eru slíkar viðgerðir ikki fevndar av lógini.

Til § 2
Ásett verður, at øll, sum eru eldri enn 25 ár, kunnu steriliserast uttan loyvi. Um grundgevingina fyri aldursmarkinum á 25 ár verður víst til pkt. 1.4.2. í almennu viðmerkingunum.

Aldursmarkið er sett til 25 ár, og hendan ásetingin er tí galdandi fram um ásetingarnar í anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021 (sundheitslógin) um, at 15 til og við 17 ára gomul sum meginregla sjálvi kunnu geva samtykki til viðgerð, men at foreldramyndugleikin sum meginregla skal kunnast og inndragast í støðutakanina hjá tí unga.

Sambært ásetingini er tað eitt krav, at viðkomandi býr í Føroyum, tað vil siga, at viðkomandi skal vera skrásettur í Landsfólkayvirlitinum sum búsitandi í Føroyum.

Tað er yvirlæknin á sjúkrahúsinum, sum hevur eftirlit við, um treytirnar um aldur og bústað eru uppfyltar. Um tær ikki eru tað, skal hann leggja umsóknina um sterilisatión fyri samráðið, sambært § 8, stk. 2. Tað vil siga, at læknin kann ikki avmarka seg til bara at nokta at fremja inntrivið.

Í kunngerð nr. 41 frá 27. apríl 2009 um gjald fyri sjúkrahúsviðgerð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 15 frá 3. mars 2020 stendur millum annað:

"§ 6. Persónar, sum í útbúgvingarørindum ella í sambandi við almannagagnligt arbeiði eru búsitandi uttanfyri Føroyar, sum eru í Føroyum, og sum frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í minsta lagi 5 ár tilsamans hava, eftir ávísing frá lækna, rætt til ókeypis veitingar og viðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum eftir somu treytum, sum eru galdandi fyri persónar, sum eru búsitandi í Føroyum. [...]"

Bústaðarkravið er galdandi uttan mun til ásetingar í sjúkrahúslógini, undir hesum í omanfyrinevndu kunngerð.

Eins og við øðrum læknaligum inntrivum kunnu læknalig atlit gera, at inntrivið vegna heilsuváðar ikki eigur at verða framt. Metingin í hesum sambandi liggur hjá tí læknanum, ið skal fremja inntrivið.

Ásett verður, at sterilisatión av persónum millum 25 og 30 ár ikki kann verða framd fyrr enn 6 mánaðir eftir, at viðkomandi hevur fingið ávísing frá kommunulækna, samanber tó § 3. Ávísing

verður ikki latin fyrr enn eftir, at tann, sum inntrivið skal fremjast á, er kannaður, kunnaður um inntrivið og vandan, sum er sambundin við inntrivið o.a.

Skotið verður sostatt upp at áseta eina kravda umhugsanartíð á 6 mánaðir fyri persónar millum 25 og 30 ár, sum ynskja sterilisatión. Endamálið við at áseta eina kravda umhugsanartíð á 6 mánaðir fyri persónar millum 25 og 30 ár er at tryggja, at hesi fáa møguleika til gjølla at umhuga avleiðingarnar av sterilisatión, ella um onnur fyribyrging hóskandi kundi verið nýtt, serliga tí at talan er um eitt varandi inntriv.

Til stk. 2.
Ásett verður, at viðgerandi lækni kann taka avgerð um, at sterilisatión kann verða framd, áðrenn 6 mánaðir eru farnir, um serlig atlit tala fyri hesum. Hetta skal verða grundað á eina ítøkiliga meting út frá støðuni hjá einstaka umsøkjaranum. Eitt serligt atlit kann til dømis vera, at ein kvinna í sambandi við eina fyrireikaða keisaraskurðviðgerð ynskir at verða steriliserað, og at tað tá eru minni enn 6 mánaðir til ætlaðu viðgerðina.

Ásett verður, at ásetingarnar í § 2, stk. 1 ikki eru galdandi fyri persónar, sum eru fevndir av ásetingunum í § 6 og § 7, tað vil siga fólk, sum ikki er før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, sum er ómyndug ella undir verjumáli, ella um tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión

Í slíkum førum kann loyvi verða givið til sterilisatión eftir umsókn frá ávikavist einum serligum verja ella frá viðkomandi og tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan ella einum verja ella einum serligum verja.

Víst verður til serligu viðmerkingarnar til § 6 og § 7.

Til § 3
Ásett verður, at ein kvinna kann verða steriliserað uttan loyvi, tá ið viðurskifti bara ella einamest av læknaligum slag gera tað neyðugt at fyribyrgja viðgongutíð til tess at forða fyri vanda fyri lívi hennara ella vanda fyri, at heilsa hennara fer at versna álvarsliga og varandi.

Tað vil siga, at tað skal vera ein læknalig orsøk, og tað skal vera ein yvirlækni, sum tekur avgerðina. Ásetingin fevnir um tey føri, har læknalig atlit í sær sjálvum eru nóg mikið til at grunda sterilisatión. Tað er yvirlæknin á sjúkrahúsinum, sum tekur avgerð, um sterilisatión skal fremjast, um álvarsligi vandin fyri lívi og heilsu kvinnunnar er grundaður á sjúku, og hetta er staðfest á sjúkrahúsinum.

Tað er nóg mikið, at sterilisatión verður mett neyðug fyri at forða fyri, at kvinnan kemur í lívsvanda. Hóast tað ikki er stórur vandin fyri, at viðgongutíðin ella føðingin kann elva til, at kvinnan doyr, eigur hon at kunna fyribyrgja viðgongutíð við sterilisatión, um vanligi vandin í viðgongutíðini og føðingini er øktur.

Avgerandi er, um heilsan viknar munandi og álvarsliga. Hetta merkir tó ikki, at dentur ikki skal leggjast á, hvussu stórur vandin er. Meðan tað við sera álvarsligum sjúkum ikki skulu setast stór krøv til, hvussu stórur vandin er, kann tað í øðrum førum vera umráðandi at meta um, hvussu stórur vandin er fyri, at heilsan viknar.

Ásetingin fevnir bæði um likamligu og sálarligu heilsuna hjá kvinnuni, og tað er ein treyt, at vandin fyri at heilsan viknar er læknaliga grundaður.

Tað er ikki neyðugt, at virkandi læknin sjálvur hevur staðfest vandan, men viðkomandi lækni kann brúka eina váttan frá einum øðrum lækna sum grundarlag.

Læknaváttanin kann eisini koma frá einum, sum ikki starvast á sjúkrahúsinum, og hon kann eisini verða gjørd, áðrenn kvinnan varð innløgd á sjúkrahúsið.

Verður sterilisatión framd fyri at lekja likamliga sjúku, er hetta ikki fevnt av ásetingini.

Ásetingin fevnir bara um sterilisatión av kvinnum. Orsakað av § 2 fevnir ásetingin vanliga bara um kvinnur yngri enn 25 ár. Skuldi tað hent, at atlit at heilsustøðuni hjá einum manni tala fyri sterilisatión, krevst loyvi til tess sambært § 4, um viðkomandi er yngri enn 25 ár.

Til stk. 2.
Ásett verður, at um treytirnar í stk. 1 eru loknar, kann hjúnafelagi ella sambúgvi hjá kvinnuni í staðin fáa loyvi til sterilisatón, samanber tó § 4, stk. 3.

Sambúgvandi skal í hesum sambandi skiljast sum persónar, sum í rúma tíð hava verið í einum samanhangandi samlívi í einum hjúnabandslíknandi parlagi, sum kann væntast at vera av varandi slag.

Tað er samráðið, sum kann geva loyvi til sterilisatión, um viðkomandi er undir 25 ár. Er viðkomandi fyltur 25 ár, hevur hann rætt til sterilisering uttan loyvi, sambært § 2.

Til § 4
Er treytirnar í § 2 ella § 3 ikki eru loknar, tað vil siga um umsøkjarin er yngri enn 25 ár ella ikki førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann eitt samráð geva loyvi til sterilisatión undir nærri ásettum treytum.

Tað kunnu vera fleiri orsakir til, at ein persónur søkir um at verða steriliseraður. Loyvi kann tí gevast til sterilisatión, hóast treytirnar ikki eru loknar til fulnar eftir eini ávísari áseting, um grundarlag er fyri at geva loyvi sambært í minsta lagi tveimum av ásetingunum, og ein samlað meting av viðurskiftunum talar fyri, at loyvi verður givið til sterilisatión. Tað er eisini ein treyt fyri at verða steriliseraður, at viðkomandi býr í Føroyum. Hetta merkir, at viðkomandi skal verða skrásettur í landsfólkayvirlitinum við bústaði í Føroyum.

Til § 4, nr. 1
Loyvi kann verða givið til sterilisatión, um tað orsakað av ættarbregði hjá umsøkjaranum ella hansara ella hennara hjúnafelaga ella sambúgva er slíkur vandi fyri, at møgulig børn fáa álvarsligar likamligar ella sálarligar sjúkur, at tað má metast at vera ynskiligt at fyribyrgja barnsburð.

Tað er ikki ein treyt, at talan altíð skal vera um ein nærliggjandi vanda fyri álvarsligari sjúku. Hvussu stórur vandin skal vera fyri, at loyvi til sterilisatión kann verða givið, veldst um, hvønn vanda talan er um. Er talan um sera álvarsliga sjúku, eiga ov stór krøv ikki at vera sett til vandan, meðan hinvegin minni álvarslig sjúka bara kann grunda sterilisatión, um talan er um rættiliga stóran vanda.

Viðurskifti, sum ikki eru ein vandi fyri virkisførið hjá einum barni seinni í lívinum, eru sostatt sum meginregla ikki grundarlag fyri at geva loyvi til sterilisatión.

Onkuntíð stendst arvaligi váðin av eini samanseting av ættarbregðinum hjá foreldrunum, og váðin kann eisini styrkjast av tí sama. Tí verður skotið upp, at tað, tá ið avgerð verður tikin um, hvørt loyvi kann verða givið til sterilisatión, eisini kann verða tikið atlit at ættarbregði hjá hjúnafelaganum ella sambúgvanum hjá umsøkjaranum. Sambúgvandi skal í hesum sambandi skiljast sum persónar, sum í rúma tíð hava verið í einum samanhangandi samlívi í einum hjúnabandslíknandi parlagi, sum kann væntast at vera av varandi slag.

Kravið um, at talan skal vera um álvarsliga sjúku, skal metast saman við, um tey viðurskifti, sum grunda eina umsókn um sterilisatión, standa mát við heilsuliga vandan, sum eitt inntriv hevur við sær.

Hvussu álvarsliga sjúku talan er um, skal eitt nú metast út frá upplýsingum um støðu og útlit hjá einum barni, viðgerðarmøguleikum, váðan við skurðviðgerðum, væntað tal á skurðviðgerðum, vanda fyri eftirsjúku umframt møguleikunum hjá einum barni at fáa vanligt virkisføri. Ásetingin fevnir sostatt eisini um álvarslig avskap.

Aktuellu viðgerðarmøguleikarnir hava eisini týdning í hesum sambandi, og tí er læknafrøðiliga menningin og tøki serkunnleikin eisini við til at staðfesta, nær loyvi kann gevast og ikki.

Talan er um eina ítøkiliga og læknafakliga meting, sum verður gjørd út frá støðuni hjá einstaka umsøkjaranum og ikki út frá eitt nú samfelagsligum atlitum. Tað er í hesum sambandi nóg mikið, at vandi er fyri, at børn fáa eina álvarsliga sjúku. Tað ber í tí sambandi ikki til at siga nakað ítøkiligt um, hvussu stórur vandin skal vera, men tað er ein treyt, at tann ítøkiligi vandin fyri, at børn menna eina ávísa sjúku, er munandi hægri enn vanligi vandin millum fólk at fáa sjúkuna.

Hjá kvinnum kunnu serlig viðurskifti gera seg galdandi, sum eins væl og ættarbregði tala fyri at ganga einum ynski um sterilisatión á møti. Hetta kann t.d. vera, um ein kvinna hevur upplivað fleiri fosturlát ella deyðføðingar, ella serlig anatomisk viðurskifti, sum hava við sær stóran vanda fyri, at eitt barn verður føtt við týðandi skaðum.

Til § 4, nr. 2.
Loyvi kann verða givið til sterilisatión, um umsøkjarin ella hansara ella hennara hjúnafelagi ella sambúgvi orsakað av sálarsjúku ella øðrum sálarligum órógvi, veikari gávuføri, grovum lyndisfrávikum ella álvarsligari likamligari sjúku, ikki megna at hava umsorgan fyri børnum á fullgóðan hátt.

Talan kann vera um støður, har umsøkjarin ber so álvarslig brek ella er so álvarsliga likamliga ella sálarliga sjúkur, at hetta avmarkar førleikarnar til at røkja dagligar uppgávur, og at umsøkjarin sostatt ikki er førur fyri at taka sær av einum barni.

Í metingin av, um umsøkjarin megnar at hava umsorgan fyri barninum ella ikki, skal dentur leggjast á, um brekið, sum umsøkjarin ber, ella sjúkan er av slíkum slag, at hetta forðar viðkomandi í at hava umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt. Tað er tí minni avgerandi, um brekið ella sjúkan annars er at meta sum álvarslig fyri umsøkjaran ella hjúnafelagan ella sambúgvan sjálvan.

Til § 4, nr. 3

Loyvi kann verða givið til sterilisatión, um tað av serligum orsøkum er týðandi vandi fyri, at umsøkjarin ella hansara ella hennara hjúnafelagi ella sambúgvi ikki megnar at fullføra viðgongutíðina, ella at barnið ikki verður lívført ella verður føtt við týðandi skaða.

Ásetingin fevnir sostatt um støður, har viðgongutíðin ber við sær ein veruligan heilsuvanda fyri annaðhvørt kvinnuna ella barnið.

Talan kann t.d. verða um støður, har viðgongutíðin hevur álvarsligar fylgjur fyri likamligu ella sálarligu heilsuna hjá kvinnuni ella støður, har undanfarnar viðgongutíðir hava havt við sær lívshóttandi ella álvarsligar trupulleikar. Talan kann eisini vera um álvarliga sálarliga sjúku, har viðgongutíðin væntandi hevur við sær, at heilsan viknar ella vandi er fyri, at heilsan viknar aftur.

Ásetingin fevnir eisini um støður, har kvinnan hevur tørv á viðgerð, sum elvir til skaða á barnið.

Ásetingin fevnir eisini um tey føri, har tað út frá einari ítøkiligari læknafakligari meting er vandi fyri, at eitt barn ikki verður lívført ella føtt við týðandi skaða, sum ikki neyðturviliga stavar frá arvaligum orsøkum.

Til § 4, nr. 4
Loyvi kann verða givið til sterilisatión, um umstøðurnar, sum umsøkjarin og familja hansara ella hennara liva undir, gera tað neyðugt at sleppa undan barnsburði.

Tá ið avgerð verður tikin, skal atlit takast at heilsuviðurskiftum, bústaðarviðurskiftum og fíggjarviðurskiftum hjá familjuni umframt tali av børnum heima, og um fleiri børn væntandi fara at elva til munandi tyngjandi umstøður við viknaðari heilsustøðu hjá umsøkjaranum, munandi størri arbeiðsbyrðu ella á annan hátt.

Ásetingin er ætlað í førum, har viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum fer at verða ein slík byrða, at ein samlað meting av viðurskiftunum grunda eina sterilisatión, hóast tað í støðuni ikki er talan um heilsuvanda fyri umsøkjaran. Tað er ikki bara atlit at umsøkjaranum, sum kann grunda eina sterilisatión, men eisini atlit at øðrum børnum í familjuni, og at tey fáa eina fullgóða uppaling. Her verður bæði hugsað um felagsbørn og serbørn. Tað sama er galdandi, um vandi er fyri, at umsøkjarin ikki megnar at halda uppi húsi og heimi sínum, um viðkomandi fær eitt barn.

Aldurin á umsøkjaranum kann hava týdning fyri ta byrðu, sum viðkomandi verður útsett fyri av at eiga fleiri børn. Jú eldri umsøkjarin er, jú størri dentur kann verða lagdur á aldurin. Tann byrðan, sum ein møguligur barnsburður elvir til, valdast í stóran mun ta byrðu, sum longu liggur á umsøkjaranum. Her er serliga talið av og aldurin á børnum, sum viðkomandi frammanundan eigur, avgerandi, eins og møguleikarnir fyri at fáa hjálp hava týdning. Av øðrum persónligum viðurskiftum, sum hava týdning, kunnu nevnast heilsan hjá viðkomandi, familjustøða, um umsøkjarin er gift ella samlivandi, ella um viðkomandi er einsamallur við børnunum.

Bústaðarviðurskifti hava stóran týdning fyri møguleikarnar hjá einari familju at skapa góðar karmar fyri uppvøksturin hjá børnum. Tað sama er galdandi fyri fíggjarlig viðurskifti, men eisini álvarslig sjúka ella avlamni hjá einum í familjuni kann seta slík krøv til umsøkjara, at viðkomandi ikki megnar eisini at ansa einum smábarni, uttan at hetta í órímiliga stóran mun gongur út yvir umsøkjaran sjálvan ella onnur børn í familjuni.

Talan er altíð um eina heildarmeting, har øll viðkomandi viðurskifti skulu takast við í metingina. Uppreksanin av teimum nevndu viðurskiftunum er sostatt ikki úttømandi.

Til stk. 2.
Ásett verður, at tá ið avgerð verður tikin um, hvørt sterilisatión kann verða loyvd, skal dentur leggjast á, um umstøðurnar, ið tala fyri sterilisatión, kunnu roknast at vera av varandi slag. Eisini skal dentur leggjast á, um viðgongutíðin hóskandi kann fyribyrgjast á annan hátt.

Sterilisatión er sum meginregla varandi, og møguleikarnar fyri at venda aftur eru sera vánaligir. Tað er tí av alstórum týdningi, at tað, áðrenn inntrivið verður framt, verður kannað væl og virðiliga, um tær umstøður, sum kunnu grunda sterilisatión, mugu metast at vera varandi, ella um tað innan rímiliga tíð kunnu væntast broytingar, sum bera við sær, at sterilisering er óneyðug.

Í seinna førinum eigur ein umsókn um sterilisering ikki at verða gingin á møti, hóast inntrivið í løtuni kann vera vælgrundað.

Hetta er serliga galdandi fyri umsóknir grundaðar á § 3, stk. 1, nr. 3, har menningarmøguleikarnar eiga at verða lýstir við aktuellari frágreiðing frá serlækna innan psykiatri ella møguliga frá einum neurolog, sum metir um møguleikarnar hjá viðkomandi at hava umsorgan fyri børnum á ein forsvarligan hátt, møguleikarnar fyri seinmenning og møguleikarnar fyri at nýta fyribyrging. Serlæknafrágreiðingin skal harafturat innihalda eina meting av, í hvønn mun viðkomandi er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, og hvørja støðu viðkomandi hevur til inntrivið.

Ásetingin ber eisini við sær, at onnur sløg av fyribyrging skulu hava verið umhugsað, men tað er ikki eitt krav, at onnur fyribyrging hevur verið roynd. Tað er heldur ikki eitt krav, at onnur fyribyrging er útilokað.

Tað verður sostatt møguligt at geva loyvi til sterilisatión í støðum, har tað verður mett at vera óhóskandi fyri persónin at brúka aðra fyribyrging. Hetta kann til dømis vera í støðum, har ein kvinna av praktiskum ella læknaligum orsøkum ikki sjálv er før fyri at nýta t.d. p-bollar á rættan hátt, ella í øðrum førum, so sum í samband við hjáárin og líknandi.

Um persónurin, sum søkir um sterilisatión, longu hevur roynt aðra fyribyrging, talar tað fyri at játta loyvi til sterilisatión.

Tað er ikki eitt krav fyri at fáa loyvi til sterilisatión, at viðkomandi frammanundan umsóknini skal vera kynsliga virkin og vera fyri ávísum vanda fyri at gerast við barn.

Til stk. 3
Ásett verður, at sterilisatión av persónum undir 18 ár ikki kann verða loyvd, uttan so at heilt serligar umstøður tala fyri tí.

Ásetingin gevur eina serliga verju til persónar undir 18 ár, har tað er eitt krav, at heilt serligar umstøður tala fyri, at viðkomandi kann fáa loyvi til verða steriliseraður. Hetta merkir, at tær treytir, sum eru nevndar í § 4, stk. 1, ikki í sær sjálvum kunnu brúkast sum grundarlag fyri sterilisatión av persónum undir 18 ár.

Sum dømi kann nevnast, at ein 25 ára gamal umsøkjari, sum ikki er førur fyri at taka sær av hvørki sær sjálvum ella at hava umsorgan fyri einum barni, kann søkja um og fáa loyvi til at verða steriliseraður sambært § 4, stk. 1, nr. 2.

Hinvegin kann ein 16-17 ára gamal umsøkjari í líknandi støðu bara fáa loyvi sambært § 4, stk. 3, um heilt serligar umstøður tala fyri tí. Tað kann t.d. vera, um tað á nøktandi hátt verður sannað, at støðan er varandi og óbøtilig, og at umsøkjarin sannlíkt ongantíð fer at verða førur fyri at taka sær av hvørki sær sjálvum ella einum barni, og at onnur sløg av fyribyrging ikki eru hóskandi

Ásetingin er sostatt ein eyka avmarking, ið tryggjar, at sterilisatión av persónum undir 18 ár bara kann fara fram í heilt serligum førum, har tað verður mett at vera fullkomiliga neyðugt.

Er viðkomandi undir 18 ár, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, ella ein serligur verji eisini søkja um sterilisatión. Víst verður til § 7 og serligu viðmerkingarnar til § 7.

Til § 5
Ásett verður, at tað er tann, sum inntrivið skal fremjast á, sum sjálvur skal biðja um at verða steriliseraður. Við hesum verður betri møguleiki fyri at staðfesta, um tað veruliga er viðkomandi sjálvur, sum vil steriliserast, og at viðkomandi ikki verður tvungin til tað av øðrum.

Tann, sum vil verða steriliseraður, skal venda sær til ein kommunulækna. Viðkomandi kann eisini venda sær til ein annan lækna enn sín egna lækna. Av tí at tað er viðkomandi sjálvur, sum tekur avgerð um sterilisatión, er tað ikki eitt krav, at hjúnafelagin ella samlivin skal úttala seg ella geva samtykki í samband við inntrivið.

Tann, sum søkir um sterilisatión, skal útfylla og undirskriva eitt oyðublað. Tað vil siga tann, sum inntrivið skal fremjast á, ella ein verji sambært § 6. Er tann, sum inntrivið skal fremjast á, ómyndugur, ella tað av sálarligu støðuni hjá umsøkjaranum ella øðrum orsøkum er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, verður umsóknin sambært § 7 send av viðkomandi sjálvum og tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan ella einum serligum verja.

Læknin hevur skyldu til at tryggja sær, at tann, sum søkir um at verða steriliseraður, lýkur ásettu treytirnar

Bæði læknin og umsøkjarin skulu skrivliga vátta, at umsøkjarin hevur fingið vegleiðing og kunning um inntrivið sambært § 11. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 11.

Til stk. 2
Ásett verður, at um viðkomandi er innlagdur á psykiatriska deplinum ella undir eftirliti hjá psykiatriska deplinum, kann umsóknin latast avvarðandi yvirlækna.

Ásetingin gevur møguleika fyri, at umsókn um sterilisatión kann latast avvarðandi yvirlækna, um viðkomandi er innlagdur á psykiatriska deplinum ella undir eftirliti hjá deplinum.

Endamálið við hesi áseting er at tryggja eina smidliga og lættari mannagongd hjá persónum, sum frammanundan eru í sambandi við psykiatriina.

Tað kann vera trupult ella óhóskandi hjá fólki við t.d. sálarligum sjúkum og teirra avvarðandi at taka samband við egna lækna fyri at søkja um sterilisatión. Hetta er serliga galdandi fyri

persónar við álvarsligum sálarligum trupulleikum ella avmarkaðum førleika at umsita síni egnu viðurskifti.

Við at lata yvirlæknanum á psykiatriska deplinum umsóknina, verður umsitingarliga byrðan lættari fyri umsøkjaran ella tey avvarðandi, og tryggjað verður, at umsóknin verður viðgjørd av einum persóni, sum hevur innlit í støðuna hjá viðkomandi.

Til § 6
Er tann, sum søkir um sterilisatión, ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið geva loyvi til sterilisatión eftir umbøn frá einum verja ella einum serligum verja. Í slíkum førum krevst loyvi frá samráðnum, hóast viðkomandi er eldri enn 25 ár.

Tað er ein treyt fyri at geva loyvi, at sterilisatión verður mett neyðugt fyri at verja heilsuna og lívsumstøðurnar hjá viðkomandi.

Hetta ber við sær, at tað skal vera meira enn bara ynskiligt og ráðiligt at fremja inntrivið, eins og dentur verður lagdur á at verja viðkomandi, sum inntrivið er ætlað á. Endamálið er at tryggja, at sterilisatión ikki verður brúkt sum eitt fyribyrgjandi ella sosialt tiltak, men einans tá læknaligar og heilsuligar grundir tala fyri tí.

Við lívsumstøður verður t.d. hugsað um støður, har viðkomandi vegna sjúku ella aðar álvarsligar umstøður ikki megnar at vera við barn ella at taka sær av einum barni, og at hetta kann elva til álvarligar og varandi avleiðingar fyri lívsgóðskuna hjá viðkomandi sjálvum.

Kvinna kann verða steriliserað, tá ið viðurskifti bara ella einamest av læknaligum slag gera tað neyðugt at fyribyrgja viðgongutíð til tess at forða fyri vanda fyri lívi hennara ella vanda fyri, at heilsa hennara fer at versna álvarsliga og varandi. Tá er støðan fevnd av § 3, og tá er hvørki neyðugt við umsókn frá verjanum ella loyvi frá samráðnum.

Verjin verður tilnevndur eftir reglunum í §§ 5 og 50 í verjumálslógini. Tað er Familjufyrisitingin, sum tilnevndir verjan. Víst verður til Anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Hevur viðkomandi longu ein verja, og áhugamálini hjá fasta verjanum eru í andsøgn við áhugamálini hjá tí, sum er undir verjumáli, kann ein serligur verji tilnevnast sambært § 50 í verjumálslógini til at taka støðu til spurningin um sterilisatión, um tað verður mett skynsamt. Tilnevnan av serligum verja sambært § 50 í verjumálslógini er treytað av, at verjumál er sett í verk sambært § 5 í verjumálslógini.

Sambært § 26 í verjumálslógini hevur persónur, sum verjumál er sett í verk fyri, framhaldandi rætt til samávirkan, og verjin hevur skyldu til at taka viðkomandi við í týðandi avgerðir. Uttan mun til, hvussu víttfevnandi eitt verjumál er, kann viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, virka frítt persónliga. Tað merkir, at ein verji aldrin kann noyða viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, at gera eitthvørt ella til at lata vera við at gera eitthvørt.

Til § 7
Ásett verður, at loyvi krevst til sterilisatión, um umsøkjarin er ómyndugur ella undir verjumáli, hevur sálarsjúku, viknað sinnisligt virkisføri, ella tað av sálarligu støðuni hjá umsøkjaranum annars er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión.

Børn og ung undir 18 ár eru undir foreldramyndugleika. Hetta er tó ikki galdandi, um tey eru gift.

Um tað er ivasamt at lata viðkomandi søkja sjálvur veldst um eina ítøkiliga læknaliga meting í hvørjum einstøkum føri av tí, sum søkir um sterilisatión. Tað er kommunulæknin, sum fær umsóknina, sum ger hesa metingina.

Ásetingin fevnir sostatt um støður, har umsøkjarin skilir týdningin av inntrivinum, men har sálarliga støðan hjá umsøkjaranum ger, at tað er ivasamt at lata viðkomandi søkja sjálvur.

Í slíkum førum kann samráðið geva loyvi til sterilisatión eftir umsókn frá tí, sum inntrivið skal fremjast á, og frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan ella einum verja ella serligum verja.

Verjin verður tilnevndur eftir reglunum í §§ 5 og 50 í verjumálslógini. Tað er Familjufyrisitingin, sum tilnevndir verjan. Víst verður til Anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Sambært § 26 í verjumálslógini hevur persónur, sum verjumál er sett í verk fyri, framhaldandi rætt til samávirkan, og verjin hevur skyldu til at taka viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, við í týðandi avgerðir. Uttan mun til, hvussu víttfevnandi eitt verjumál er, kann viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri, virka frítt persónliga. Tað merkir, at ein verji aldrin kann noyða viðkomandi, sum verjumál er sett í verk fyri at gera eitthvørt ella til at lata vera við at gera eitthvørt.

Til § 8
Metir læknin, at tann, sum inntrivið skal fremjast á, ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um tað er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, sambært §§ 6 og 7, skal læknin leggja umsóknina fyri samráðið saman við sínum úttalilsi.

Tað hevur stóran týdning fyri umsøkjaran og fyri viðgerðina av málinum, at læknin beinanvegin sendir umsóknina um sterilisatión víðari til samráðið. Tað hevur somuleiðis stóran týdning fyri viðgerðina av málinum í samráðnum, at læknin hevur givið so nágreiniligar upplýsingar sum gjørligt.

Upplýsingar, sum kunnu vera viðkomandi fyri samráðið, eru um støðuna ella sjúkuna hjá umsøkjaranum, sum kunnu tala fyri sterilisatión sambært § 4, virkisførið hjá umsøkjaranum, um umsøkjarin brúkar ella hevur brúkt fyribyrging og ein meting av, um og hvussu umsøkjarin frameftir kann brúka fyribyrging. Bústaðar- og familjuviðurskiftini hjá umsøkjaranum eins og persónligu og sosialu viðurskiftini hjá umsøkjaranum eru eisini viðkomandi.

Til § 9
Ásett verður, at tann, sum inntrivið er ætlað á, og sum ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum ella sum er ómyndugur ella undir verjumáli, og tað av sálarligu støðuni hjá umsøkjaranum annars er ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión, skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu, áðrenn samráðið viðger umsóknina.

Endamálið við samrøðunum er at tryggja, at viðkomandi fær møguleika at hugsa og hugleiða um tað at verða steriliseraður út frá egnu fortreytunum hjá viðkomandi. Ein slík samrøða kann vera til gagns fyri til dømis fólk við menningartarni, sálarsjúku ella øðrum sjúkum. Endamálið er sostatt at verja og virða sjálvsavgerðarrættin og persónliga integritetin hjá tí einstaka.

Tilboð um samrøðu kann soleiðis stuðla viðkomandi í at forma og siga sína egnu hugsan og støðu til at verða steriliseraður og soleiðis stuðla viðkomandi í at taka avgerð á upplýstum grundarlagi.

Um viðkomandi undir samrøðuni gevur til kennar iva ella sigur, at viðkomandi ikki vil verða steriliseraður, eigur tað í samrøðuni at verða viðgjørt, hvussu hetta kann verða boðað víðari til tann, sum umsitur áhugamálini hjá tí, sum inntrivið skal fremjast á, ella tann læknan, sum viðkomandi seinni skal tosa við og kannast av, um umsóknin um sterilisatión framvegis verður fasthildin.

Um umsóknin um sterilisatión verður fasthildin, skulu hesar upplýsingar leggjast fyri samráðið, sum skal taka avgerð í málinum. Um tað undir samrøðuni greitt er komið fram, at viðkomandi ikki ynskir at verða steriliseraður, skal samráðið í síni viðgerð av málinum leggja hetta til grund og kann tá ikki geva loyvi til sterilisatión. Eingin heimild er til at fremja inntrivið við tvingsli.

Talan er um eitt tilboð um samrøðu, sum viðkomandi grundað á umhugsni fyri tí einstaka og virðing fyri teirra sjálvsavgerðarrætti og persónliga integriteti ikki hevur skyldu til at taka ímóti.

Samrøðan skal vera við viðkomandi fakfólk, t.d. ein seksualvegleiðara ella sosialráðgeva við serligari vitan á økinum. Av tí at talan er um eitt tilboð um óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu, skal fakfólkið ikki hava dagligt samband við viðkomandi.

Tilboðið er ikki avmarkað til bara eina samrøðu, men kann fevna um nakrar samrøður, um mett verður, at tørvur er á tí.

Til § 10.
Landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta nærri reglur um umsókn um sterilisatión og um viðgerð av málum um sterilisatión. Landsstýrisfólkinum verður eisini heimilað at áseta nærri reglur um ráðgeving og stuðulssamrøðu í sambandi við sterilisatión.

Her verður m.a. hugsað um mannagongdina, tá ið søkt verður um sterilisatión, t.d. við oyðublaði, hvørjar upplýsingar skulu leggjast við umsóknini o.a., og um innihaldið í vegleiðingini og kunningini, sum umsøkjarin hevur krav uppá. Eisini kann verða ásett, at umsókn kann latast inn talgilt. Innihaldið í ráðgevingini og stuðulssamrøðuni kann verða skipað nærri, soleiðis at tryggjað verður, at innihaldið er eins fyri øll.

Til § 11
Ásett verður, at læknin, sum fær eina umsókn um sterilisatión, skal vegleiða og kunna tann, sum inntrivið skal fremjast á, um sjálvt inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið.

Læknin eigur eisini at kunna viðkomandi um avmarkaðu møguleikarnar fyri at endurskapa nøringarførið, trygdina við sterilisering og aðrar møguleikar fyri at fyribyrgja viðgongutíð.

Bæði umsøkjarin og læknin skulu skriva undir uppá, at umsøkjarin hevur fingið viðkomandi vegleiðing og kunning.

Læknin hevur eisini skyldu til at vegleiða og kunna tey, sum søkja sambært §§ 6 og 7, tað vil siga verjan ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleika. Hesi skulu somuleiðis skriva undir upp á at hava fingið vegleiðing og kunning.

Til § 12
Landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum tekur avgerð um, hvørt loyvi kann verða givið til sterilisatión, um tann, sum inntrivið skal fremjast á ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er undir 25 ár, og tað verður mett ivasamt, at viðkomandi sjálvur søkir um sterilisatión.

Tá ið samráðið verður sett, eigur landsstýrisfólkið at tryggja, at samráðið bæði politisk og í aðrar mátar er óheft, og at tey, sum verða tilnevnd í samráðið, hava innlit í faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri virkið hjá samráðnum. Hetta kann verða gjørt við, at landsstýrisfólkið setir limirnar í samráðnum eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum og avvarðandi fakfeløgum.

Ásett verður, at samráðið skal taka avgerð skjótast gjørligt, tað vil siga so skjótt sum til ber við atliti at málsgongdini, soleiðis at neyðug fyrireiking og faklig viðgerð verður tryggjað og uttan óneyðugt drál.

Í teimum førum, har loyvi til sterilisatión krevst frá samráðnum, skal umsøkjarin útfylla eitt oyðublað hjá læknanum. Læknin sendir oyðublaðið til samráðið saman við journalini og skjalprógvi fyri møguligum kanningum, sum eru gjørdar. Um tørvur er á tí, fær samráðið til vegar tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna taka avgerð í málinum. Víst verður í hesum sambandi til § 27, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

Eru ivamál, kann samráðið biðja um fleiri upplýsingar, t.d. metingar frá lækna, ella at fleiri kanningar hjá serlækna verða gjørdar. Endamálið er at lýsa viðurskiftini hjá umsøkjara so væl sum gjørligt. Málsviðgerðartíðin í samráðnum kann tá taka longri tíð.

Er umsókn um sterilisatión grundað á sosial og persónlig viðurskifti, fær samráðið til vegar fleiri upplýsingar, og hetta verður vanliga gjørt við at hava eina samrøðu við umsøkjaran og ein møguligan maka. Umsøkjarin hevur sum meginregla rætt til at hava ein hjásita við sær og um neyðugt eisini ein tulk, teknmálstulk ella onnur, sum tørvur er á.

Til stk. 2.
Í samráðnum eru ein løgfrøðingur, serlækni í psykiatri og ein sosialráðgevi. Hetta fyri at tryggja eina víðfevnda og gjølliga meting av fleiri ymiskum atlitum, sum eitt mál um sterilisatión má metast at viðføra.

Við at brúka løgfrøðiligan, læknafrøðiligan, sosialfakligan fakkunnleika er góður møguleiki fyri at meta um samlaðu støðuna hjá umsøkjaranum og at taka eina vælgrundaða avgerð, sum leggur upp fyri bæði rættindunum og likamligu og sálarligu heilsuni hjá umsøkjaranum.

Til stk. 3.
Ásett verður, at limirnir í samráðnum og teirra varalimir verða vald fyri 4 ár í senn. Somu limir kunnu veljast aftur.

Til stk. 4.
Landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið. Starvsskipanin kann t.d. innihalda ásetingar um heimildarøkið, reglur um innkalling til fund, um viðtøkuføri, hvussu fundirnir verða skipaðir, nær viðgerðin kann vera á skrivligum grundarlagi, um ógegni, tagnarskyldu o.a., umframt reglur um at senda víðari avgerðir til Føroya Kærustovn, sum er kærumyndugleiki.

Til § 13
At taka avgerð um, hvørt loyvi til sterilisatión kann verða givið ella ikki, er ein sera inntrívandi avgerð, sum beinleiðis ávirkar rættindi og førleikar hjá fólki.

Avgerðir hjá samráðnum verða tí tiknar við vanligum meiriluta.

Til § 14
Ásett verður, at avgerðir hjá samráðnum kunnu kærast til Føroya Kærustovn. Kærufreistin er 4 vikur eftir, at avgerðin er fráboðað viðkomandi.

Tað er bæði umsøkjarin sjálvur, sum kann kæra avgerðina, og verjin ella foreldramyndugleikahavin, um hesi hava søkt um sterilisatión vegna tann, sum inntrivið eftir ætlan skal fremjast á sambært §§ 6 og 7.

Til stk. 2
Tað er ásett í løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, at í málum, har serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, verður Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum.

Í uppskotinum verður ásett, at í sterilisatiónsmálum eru serkøn altíð við at taka avgerð. Tey serkønu hjá Føroya Kærustovni í sterilisatiónsmálum eru ein serlækni í kvinnusjúkum og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin. Hesi serkønu skulu taka avgerð í kærumálum um sterilisatión saman við løgfrøðingunum á Føroya Kærustovni.

Til stk. 3
Ásett verður, at burtursæð frá stk. 1 og 2 er løgtingslóg um Føroya Kærustovn galdandi fyri málsgongdina í Føroya Kærustovni.

Víst verður í hesum sambandi til løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, har viðgerðin av kærumálum er nærri ásett.

Til § 15
Ásett verður, at samráðið kann geva loyvi til kastratión.

Ásetingin broytir galdandi lóg soleiðis, at tað frameftir verður samráðið, ið gevur loyvi, og ikki landsstýrisfólkið.

Loyvið verður givið eftir at hava fingið ein frágreiðing frá rættarlæknaráðnum, sum kann grunda, at kynstráanin setir viðkomandi í vanda fyri at fremja brotsgerðir ella førir við sær álvarsligar sálarligar sjúkur ella sosiala skerjan.

Tað er eitt krav, at viðkomandi býr í Føroyum, tað vil siga, at viðkomandi skal vera skrásettur í Landsfólkayvirlitinum sum búsitandi í Føroyum.

Í kunngerð nr. 41 frá 27. apríl 2009 um gjald fyri sjúkrahúsviðgerð, sum seinast broytt við kunngerð nr. 15 frá 3. mars 2020 stendur millum annað:

"§ 6. Persónar, sum í útbúgvingarørindum ella í sambandi við almannagagnligt arbeiði eru búsitandi uttanfyri Føroyar, sum eru í Føroyum, og sum frammanundan fráflyting úr Føroyum hava verið skrásettir í fólkayvirlitinum í minsta lagi 5 ár tilsamans hava, eftir ávísing frá lækna, rætt til ókeypis veitingar og viðgerð í føroyska sjúkrahúsverkinum eftir somu treytum, sum eru galdandi fyri persónar, sum eru búsitandi í Føroyum. [...]"

Bústaðarkravið er galdandi uttan mun til ásetingar í sjúkrahúslógini, undir hesum í omanfyrinevndu kunngerð.

Í § 1, stk. 2 í uppskotinum er ásett, at inntriv og viðgerðir til at grøða likamliga sjúku ikki eru fevnd av lógini. Um ein sjúka í kyngøgnunum ger tað neyðugt at taka burtur kynskertlarnar, kann inntrivið verða framt uttan serligt loyvi. Hetta er eisini galdandi, um eitt slíkt inntriv í øðrum førum kann lekja eina likamliga sjúku.

Tá talan er um viðgerð av sálarligum sjúkum er tó staðfest, at hetta hongur so tætt saman við orsøkunum, sum annars kunnu føra til kastratión, at reglurnar í lógini eiga at verða nýttar.

Mett verður ikki, at tørvur er á serligum reglum um kastratión av læknaligum orsøkum, sum annars er galdandi fyri sterilisation, sambært § 2 í uppskotinum.

Til § 16
Ásett verður, at loyvi kann ikki verða givið til kastratión av persóni undir 25 ár.

Ásetingin broytir galdandi lóg soleiðis, at aldursmarkið verður broytt frá at vera 21 ár til at vera 25 ár.

Av tí at loyvi til kastratión bara verður givið, har persónurin hevur verið ígjøgnum eina longri metingargongd, verður ikki mett neyðugt at áseta eina kravda umhugsanartíð í sambandi við umsóknargongdina.

Sambært galdandi lóg er heimild til at geva loyvi til kastratión av persónum undir 21 ár, um heilt serligar orsakir tala fyri tí. Skotið verður upp, at heimildin til at veita undantak, um heilt serligar orsakir tala fyri tí, verður strikað. Hetta er við til at tryggja rættindi hjá fólki.

Talan er um eitt somikið inntrívandi inntriv, sum kann hava ógvusligar kropsligar og sálarligar fylgjur. Talan er eisini um eitt varandi inntriv. Um mett verður, at veruligur tørvur er á kastratión, er alternativ medisinsk viðgerð tøk, eins og viðkomandi møguliga kann hava gagn av eitt nú psykoterapi, at vera undir fakligum eftirlit o.a.

Til § 17
Ásett verður, at §§ 6, 7 og 11 eru somuleiðis galdandi fyri umsóknir um kastratión.

Í §§ 6 og 7 er ásett, at um tann, sum inntrivið er ætlað á, ikki er førur fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um viðkomandi er undir 25 ár, og tað verður mett ivasamt, at viðkomandi

sjálvur søkir, so kann ein verji ella ein serligur verji ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, søkja fyri viðkomandi.

Ávísingin til §§ 6 og 7 merkir, at somu málsviðgerðarreglur, sum eru galdandi fyri umsóknir um sterilisering, eisini eru galdandi fyri kastratión.

Sambært § 11 skal læknin, sum fær umsóknina um sterilisatión, vegleiða og kunna tann, sum inntrivið skal fremjast á, um sjálvt inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið. Tað sama er galdandi fyri tann, sum søkir sambært §§ 6 og 7.

Ávísingin til § 11 tryggjar, at hendan vegleiðingarskyldan eisini er galdandi í sambandi við kastratión. Henda vegleiðing skal tryggja, at umsøkjarin tekur eina upplýsta og vælgrundaða avgerð.

Av tí at kastratión er eitt somikið inntrívandi inntriv, har tað ikki vendist aftur, og sum kann hava álvarsligar kropsligar og sálarligar fylgjur, er tað avgerandi, at viðkomandi fær umfatandi vegleiðing, sum fevnir um bæði medisinsk, psykososial og onnur viðkomandi viðurskifti.

Læknin skal eisini tryggja sær, at umsøkjarin hevur skilt upplýsingarnar, undir hesum avleiðingar fyri hormonjavnvág, nøringarføri og møgulig sálarlig eftirárin.

Ásetingin tryggjar eisini, at sama vegleiðing verður givin persónum, sum vegna annan persón søkja um kastratión sambært §§ 6 og 7.

Til § 18
Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur um umsókn um kastratión og um viðgerð av málum um kastratión. Tað kann vera um mannagongdina, tá ið søkt verður um kastratión, t.d. við oyðubløðum, o.a. Eisini kann verða ásett, at umsókn kann latast inn talgilt.

Til § 19
Ásett verður, at sterilisatión og kastratión einans kann verða framd av viðkomandi serlækna.

Við hesum verður tryggjað, at inntriv sambært lógini verða framd av læknum við serligum fakligum førleika, tað eru serlæknar í kvinnusjúkum, obstetrik og urologi. Somuleiðis verður tryggjað, at læknin hevur autorisatión og er undir eftirliti sambært heilsulóggávu.

Ásetingin ber við sær, at um lógarásettu treytirnar fyri sterilisatión og kastratión eru loknar, kunnu inntrivini verða framd í sjúkrahúsverkinum og í privatari praksis. Verður inntrivið framt í privatari praksis, rindar borgarin tó sjálvur fyri inntrivið.

Samstundis sum tryggjað verður, at øll hava rætt til og atgongd til sterilisatión, um lógarásettu treytirnar annars eru loknar, fær borgarin harvið møguleikan at velja millum alment og privat tilboð.

Til § 20
Ásett verður, at tann, sum fremur sterilisatión ella kastratión uttan, at treytirnar sambært hesi lóg eru loknar, verður revsaður við sekt.

Hevur lækni framt inntrivið uttan loyvi frá samráðnum, men har treytirnar fyri at fremja inntrivið annars eru loknar, er talan um linnandi umstøður.

Sambært ásetingini kann tann, sum fremur inntrivið, verða revsaður við sekt. Hetta útihýsir ikki, at læknin kann verða dømdur harðari revsing, um heimild er fyri tí í revsilógini.

Til § 21
Gildiskomuáseting og úrgildisseting.

Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi 1. januar 2026, so at tíð er at fyrireika seg til broytingarnar sambært uppskotinum. T.d. skal landsstýrisfólkið seta eitt samráð, og Føroya Kærustovnur skal velja tey serkønu, sum skulu vera við í kæruviðgerðini.

Almannaverkið skal fyrireika seg til nýggju uppgávuna at veita ráðgeving og stuðulssamrøðu, og innihaldið í tilboðnum skal skipast.

Eisini fær landsstýrisfólkið høvi til at áseta nærri reglur um ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 9, áseta nærri reglur um sterilisatión sambært § 4, stk. 4, um umsókn og viðgerð av málum um sterilisatión og kastratión sambært § 10 og 18 og áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið sambært § 12, stk. 4.

Ásett verður, at samstundis, sum løgtingslógin kemur í gildi, fer galdandi sterilisatiónslóg úr gildi. Tað er lov nr. 234 af 3. juni 1967 om sterilisation og kastration, sum sett í gildi við kongelig anordning nr. 73 frá 14. marts 1968, og sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017.

Løgmálaráðið, 23. september 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Kommunulæknafelag Føroya
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Klaksvíkar sjúkrahúsi
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Jóhan Petur Davidsen, serlækna í urologi og parenkymkirurgi
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Landssjúkrahúsinum
Fylgiskjal 6: Ummæli frá MEGD
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Javnstøðunevndini
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Etiska ráðnum
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Almannaverkinum
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Familjufyrisitingini - samandráttur